GRANSKINGARVERKÆTLANIN FYRI ØKISMENNING

# Ung, útbúgving og fiskivinna

Olga Biskopstø og Bjarni Mortensen

*Granskingardepilin fyri Økismenning*

**ARBEIÐSRIT NR. 9/2004**

# ARBEIÐSRIT

**WORKING PAPER**

ISSN 1601-9423

**Granskingarverkætlanin fyri Økismenning**
**Center for Local and Regional Development**
**Jústabrekka 1 • Postrúm 159 • 700 Klaksvík**
**Tel. +298 45 77 44 • 37 44 77 (Suðuroy) • Fax + 298 45 77 43**
**e-mail: region@region.fo • Heimasíða: www.region.fo**

# Ung, útbúgving og fiskivinna

Olga Biskopstø og Bjarni Mortensen

*Granskingardepilin fyri Økismenning*

## ARBEIÐSRIT NR. 9/2004

**ISBN 99918-971-8-6**

*Um arbeiðsrit:*
Arbeiðsrit eru samfelagsfakliga grundað arbeiði, sum eru minni í vavi og dýpd enn veruligar granskingarverkætlanir. Hesi rit kunnu eitt nú vera umbidnar kanningar, t.e. kanningararbeiði sum Granskingardepilin ger aftur fyri gjald. Hetta kunnu eisini vera ávegis arbeiði av størri granskingarverkætlanum, undirvisingar- og kunningartilfar ella líknandi. Arbeiðsrit verða altíð skrivað á føroyskum. Hava fólk handrit, sum halda hóska til útgávu í Arbeiðsriti, eru tey vælkomin at seta seg í samband við depilin (sí adressu á forsíðuni).

# Formæli

Í seinnu helvt av árinum 2002 fór Granskingardepilin fyri økismenning undir eina verkætlan: “Rekruttering til fiskivinnuna”. Yvirskipaða endamálið er at viðgera spurningin um ungdóm, útbúgvingarval og framtíðina hjá føroysku fiskivinnuni. Verkætlanin tekur støði í tí andsøgn, at samstundis sum alt fleiri ung velja fiskivinnuna frá, tá ið tey skulu velja lívsleiðina, so er tað alt meiri viðurkent, at tað eisini í komandi árum er fiskivinnan, vit skulu seta okkara lít á. Men tað er eitt heilt annað slag av fiskivinnu enn tann, vit kenna, sum talan verður um. Tí samstundis, sum tørvurin á fólki í veiðuliði og vanligari fiskaframleiðslu er minkandi, vaksa krøvini til okkara førleika sum fiskivinnutjóð. Krøv um burðardygga menning, nýggj marknaðarkrøv, nýggja tøknifrøði, nýggjar matvørur, nýggir stýringarhættir og økt krøv til arbeiðsviðurskifti og -umhvørvi, eru bara nøkur av teimum fyribrigdum, sum troka seg framat. Alt hetta merkir, at fiskivinnan hevur ein alt størri tørv á førleikamenning, og hetta er galdandi fyri øll lið í vinnuni.

Henda frágreiðingin er tann triðja av íalt 4, sum samlaða verkætlanin um “Rekruttering til fiskivinnuna” umfatar. Grundarlagið fyri hesi kanningini er ein størri spurnablaðskanning millum føroyskan ungdóm, sum umframt spurningar viðvíkjandi fiskivinnu eisini fevnir um fleiri onnur viðurskifti av samfelagsfrøðiligum týdningi. Vit valdu at gera eina størri spurnablaðskanning, enn upprunaliga ætlað, hetta fyri at fáa eitt so rúgvismikið tilfar sum gjørligt, tí at arbeiðið við útbering, databasa o.a. kortini skuldi gerast. Av tí sama hevur viðgerðin av tilfarinum tikið longri tíð enn upprunaliga ætlað, men fyrimunurin er, at tað framvegis finst eitt virðismikið tilfar at byggja víðari kanningar á. Vit takka hjartaliga teimum, sum hava hjálpt okkum at fáa spurnabløðini runt á skúlunum, og teimum, sum hava ómakað sær við at svara.

Verkætlanin “Rekruttering til fiskivinnuna”, varð stuðlað av Fiskivinnuroyndum, Búagrunninum, Kósini P/F, Pure Water P/F, JFK Trol P/F, Delta Seafood, Sandoy Seafood, United Seafood, Fiskavirkinum í Gøtu og S/pf. Norðoyggjafelagnum. Vit takka fyri stuðulin og vóna, at hann kemur fiskivinnuni til góðar.

Klaksvík, oktobur 2004

Gestur Hovgaard, Ph.D.
Verkætlanarleiðari

# Innihaldsyvirlit

**Inngangur** ........ 9

**1. Partur, Ung, útbúgving og arbeiði** ........ 11
Útbúgving – sjálvandi! ........ 11
Fyrimunir við útbúgving ........ 12
Hvat ynskja tey ungu av teirra útbúgving? ........ 12
Útbúgving og framtíðar starv ........ 13
Munur á gentum og dreingjum ........ 14
Mest aktuellu útbúgvingarnar ........ 14
Arbeiðs- og familjulív ........ 14
Áhugi og dugnaskapur ........ 15
Hvat gera tey í frítíðini? ........ 16
Samleiki, hugburður og eginleikar ........ 17
Bjartskygni og sjálvsálit ........ 18
Bústaður, útbúgving og vinna ........ 18
Ùtheimurin dregur ........ 19
Samanumtøka ........ 20

**2.partur, Tey ungu og fiskivinnan** ........ 23
Royndir og kunnleiki ........ 23
Hvar vilja føroyskir ungdómar arbeiða? ........ 24
Kynsbýtið ........ 25
Hvar vilja føroyskar gentur arbeiða? ........ 26
Hvar vilja føroyskir dreingir arbeiða? ........ 27
Hvørji størv í fiskivinnuni eru mest áhugaverd? ........ 28
Gransking og tøknimenning ........ 28
Hvussu trívast tey í fiskivinnuni? ........ 28
Ymsar fortreytir at fáa arbeiðsmegi ........ 30
Fiskivinnan og ynskini hjá ungdóminum ........ 31
Ávirkan .. 32
Samanumtøka ........ 32

**Niðurstøður** ........ 35
Fiskivinna og økismenning ........ 35
Tey ungu og framtíðin hjá fiskivinnuni ........ 36
Tilmælir .. 37

**Keldulisti** ........ 39
**Fylgiskjøl** ........ 41
Framferðarháttur ........ 41
Útbreiðsla av spurnablaðnum ........ 42

# Inngangur

Hvørji ynski hevur ungdómurin til framtíðina, tá tað snýr seg um útbúgvingar- og vinnuval? Hvat heldur ungdómurin um fiskivinnuna, og kunnu størv har ganga ynski teirra fyri framtíðina á møti? Hesir spurningar verða lýstir í hesari frágreiðingini, ið byggir á eina víðfevnda spurnablaðskanning, gjørd millum føroyska ungdómin.

Fyri fiskivinnuna gerst kappingarstøðan truplari, og marknaðartreytirnar broytast alsamt. Nýggj tøkni og betraðar flutningsskipanir hava við sær, at landaligar forðingar fáa alsamt minni týdning. Nýggir kappingarneytar, sum t.d. Kina, økja um trýstið á føroysku fiskivinnuna. Matvørugølurnar, sum hava verið seinnu árini, gera, at brúkarin og myndugleikarnir seta størri og størri krøv til matvørutrygd og skjalprófførslu. Hetta eru nakrar av teimum ítøkiligu avbjóðingunum, sum fiskivinnan hevur fyri framman.

Hinvegin merkir økt fokus uppá eitt nú heilsu, at fiskur og fiskavørur hava góðar møguleikar at gerast framtíðarinnar matvørur. Verður vinnan før fyri at vinna á avbjóðingunum, liggja tí nógvir ótroyttir møguleikar fyri framman.

Umframt atgongd til náttúrutilfeingi og kapital, verða tað fyrst av øllum teir menniskjuligu faktorarnir, sum koma at vera avgerandi. Støðug tilgongd av dugnaligum ungfólki er tí millum týdningarmestu fortreytirnar fyri menning av fiskivinnuni. Tí er tað serstakliga umráðandi at vita, hvussu vit framhaldandi tryggja rekruttering av fólki til fiskivinnuna, og ikki minst eina rekruttering av útbúnum fólki.

Endamálið við at draga vitan burtur úr spurnakanningini “ung, útbúgving og arbeiði” er: 1) at lýsa virðir og val hjá teimum ungu, ið hava týdning í sambandi við teirra útbúgvingar- og vinnuval. 2) at kanna grundarlagið fyri tiltøkum til tess at gera fiskivinnuna meiri áhugaverda fyri ungfólk.

Kanningin byggir á spurnabløð, býtt út millum næstan 1000 næmingar í føroyska útbúgvingarverkinum. Tað vóru teir næmingarnar, sum í januar 2003 gingu í 9. flokki í føroyska fólkaskúlanum, og teir næmingar, sum tá gingu á seinasta ári í miðnámsskúlunum. Hesi ungfólk eru komin hagar til, at tey skula taka týðandi avgerðir, sum koma at ávirka teirra lívsleið, og tí hava vit valt at spyrja júst hesi ungfólkini (framferðarhátturin er lýstur nærri í fylgiskjali nr. 1).

Frágreiðingin er skipað soleiðis, at 1. partur viðger spurningin um, hvørjar vánir tey ungu hava til útbúgving, arbeiði og búseting. Ætla tey at taka eina útbúgving, hvat fara tey at leggja dent á, og hvørjar fyrimunir meta tey, at ein útbúgving fer at geva teimum. Hvørji ynski tey hava til teirra framtíðarstarv, og hvar kundu tey hugsað sær at búð í framtíðini.

Í 2. parti verður viðgjørt, hvørjar royndir tey ungu hava innan fiskivinnuna, umframt teirra hugburð til hesa somu vinnuna. Spurningar, sum verða viðgjørdir, eru millum annað, hvussu nógv hava roynt seg í fiski- og alivinnuni? Hvussu trivust tey í hesum størvum? Og meta tey, at teirra framtíðarstarv kann vera innan fiski- og alivinnuna.

Í 3. parti verður tikið samanum úrslitini av kanningini, og viðgjørt verður, hvat hesi úrslitini merkja fyri føroysku fiskivinnuna. Harumframt verða, við støði í kanningini, givin nøkur tilmæli til, hvussu styrkjast kann um rekrutteringina til fiskivinnuna.

Vit ynskja at veita eina tøkk til Gest Hovgaard, Dennis Holm, sum hava viðmerkt handritið. Eisini ein tøkk til Jákup í Skemmuni fyri rættlestur og til Abraham Mikladal fyri grafiska hjálp.

**Teknfrágreiðing:**
**(N=)**: sigur talið á teimum sum hava svarað hvørjum einstakum spurningi.

**(Sí t1.f2)**: merkir, at talan er um talvu nr.1 í fylgiskjali nr. 2; t2.f2 merkir talva 2 í fylgiskjali nr. 2, o.s.fr.

# 1. Partur

## Ung, útbúgving og arbeiði

Í hesum partinum seta vit kikaran á teir spurningar, ið lýsa, hvørji val ungdómurin hevur hug at gera í sambandi við útbúgvingar- og vinnuval, og hvat ið býr undir vali teirra. Hvørjum stremba tey ungu eftir, og hvørjar fyrimunir seta tey fram um aðrar? Hvat ætla tey at leggja dent á, tá ið tey skulu velja útbúgving og arbeiði.

Fyri at svara hesum spurningum mugu vit eisini fáa greiði á viðurskiftum, sum millum annað viðvíkja samleika, hugburði og eginleikum, ið tey ungu meta høgt.

**Útbúgving – sjálvandi!**
Tað er eyðvitað, at tørvurin hjá samfelagnum á útbúnum fólki og týdningurin, útbúgving hevur fyri samfelagsmenningina, gera, at føroyska samfelagið nýtir nógvar pengar til útbúgvingar. Ungdómurin verður støðugt kunnaður um týdningin av at hava eina útbúgving, og hann er eisini sannførdur um, at útbúgving er eitt neyðugt stig á leiðini inn í vaksnamannaheimin. Hetta kann staðfestast við, at næstan øll ung í Føroyum siga, at tey ætla at fáa sær eina útbúgving. Heili 91 % av teimum, ið luttóku í kanningini, hava svarað, at tey ætla at fáa sær eina útbúgving (sí t1.f2).

Umleið helvtin ætlar sær at taka útbúgving beint eftir tað, at tey eru liðug við fólka- ella miðnámsskúla, meðan hin helvtin ikki hevur nakran skund (sí t2.f2) Tey vilja bíða til seinni. Tey eru m.a. skúlatroytt, ætla at vinna pening fyrst, ja, njóta lívið, áðrenn tey fara aftur á skúlabonk (sí t3.f2). Sama er galdandi, tá tey verða spurd, um tey vita, hvørja útbúgving tey ætla sær. Ein helvt er avklárað og veit, hvat hann/hon vil, men hin helvtin hevur ikki valt (sí t4.f2).




**Mynd 1.1**
*Sp. Hvørjar fyrimunir metir tú, ein útbúving gevur? (set 1 kross á hvørja reglu, t.v.s. Við bæði a, á, b, d, ð, e, f)*




**Mynd 1.2**
*Sp. Hvørji viðurskifti fert tú at leggja dent á, tá ið tú skalt gera av, hvøjra útbúgving tú fert undir? (set 1 krossa hvørja reglu, t.v.s. Við bæði a, á, b, d og ð)*

## Fyrimunir við útbúgving

Tey ungu meta, at útbúgving er lykilin til framtíðina. Hetta sæst við at hyggja at teimum fyrimunum, ið ungdómurin metir, at ein útbúgving ber við sær. Tey eru ikki í iva um, at talan er um eina røð av fyrimunum, hóast tey ikki eru á einum máli um, hvørjir fyrimunir eru størri enn aðrir. Raðfestingin millum tey ungu sæst á mynd 1.1.

Størsta fyrimunin við at fáa sær eina útbúgving halda tey ungu vera, at tað gevur teimum møguleika at arbeiða við tí, tey hava hug til.

Nógv teirra eru samd um, at ein útbúgving gevur teimum betri vinnuligar møguleikar, og at tey fáa størri ávirkan á egið arbeiði. Fleiri halda harumframt, at útbúgving gevur størri lívsgleði, størri sjálvsvirðing og størri persónligt frælsi.

Samanumtikið ber tí til at siga, at millum tey ungu er eitt ógvuliga stórt bjartskygni um, at tað loysir seg at fáa sær eina útbúgving, og at útbúgving kann vera vegurin til at røkka tí, sum tey fegin vilja í lívinum.

## Hvat ynskja tey av teirra útbúgving?

Umframt at síggja fyrimunirnar við at fáa sær útbúgving, eru tey eisini tilvitað um, hvat tey leggja dent á, tá ið tey velja, hvørja útbúgving, tey skulu undir, sí mynd 1.2.

Tey allarflestu leggja í stóran ella í ávísan mun dent á, at útbúgvingin gevur teimum møguleika fyri einum væl løntum arbeiði. Og næstan líka nógv raðfesta, at útbúgvingin er ein avbjóðing og stuttlig.

Tey eru eitt sindur færri, ið raðfesta, at útbúgvingin gevur teimum góðar vánir fyri at sleppa undan arbeiðsloysi. Hetta kann tulkast, sum at ein partur av teimum ungu eru til reiðar at taka ein ávísan vága í mun til arbeiðsloysi, afturfyri at sleppa at fáast við tað, tey halda vera eina avbjóðing og stuttligt.

Tey ungu ætla serliga at leggja dent á, at útbúgvingin gevur teimum góða løn og avbjóðingar. Tað sæst samstundis, at tey samfelagsligu atlitini verða raðfest nógv lægri. At útbúgvingin gevur møguleika fyri at arbeiða í heimbygdini, og er týdningarmikil fyri samfelagið, hevur nevniliga




**Mynd 1.3**
*Sp. Hvørji ynski hevur tú til títt framtíðarstarv? Um tú skuldi valt millum viðurskiftini niðanfyri, hvørji hevði tú so raðfæst hægst? (Brúka tølini 1-5 til tínar raðfestingar - 1 fyri ynskið, tú setir fremst o.s.v.)*

munandi minni undirtøku millum tey ungu. Og tað, sum hevur lægst undirtøku, er, at útbúgvingin er høgt í metum millum fólk.

Tey ungu síggja sostatt útbúgvingina sum eina heilt persónliga verkætlan, sum ikki er so nógv tengd at, hvat onnur halda.

Valið er tengt at nógvum ymiskum viðurskiftum, og ikki nakrari ávísari mentan ella normi. Tað merkir sjálvsagt ikki, at tey ikki lata seg ávirka av umhvørvinum, miðlunum o.ø., men tað merkir, at tey eru ógvuliga tilvitað um, at hetta í botn og grund er teirra egna val og ábyrgd.

## Útbúgving og framtíðar starv

Gott samsvar er millum tað, sum tey ungu ynskja sær av einari útbúgving, og tað, sum tey ynskja sær av framtíðarstarvi sínum. Á mynd 1.3 sæst, at tey flestu vísa á, at arbeiðið skal geva teimum eina góða løn. Næst kemur, at starvið skal passa til teirra evni og førleika, og at arbeiðið gevur teimum spennandi og krevjandi avbjóðingar. Hereftir koma meiri sosial viðurskifti, sum at hava dámligar starvsfelagar, og at passaligt býti er millum arbeiði og frítíð. Áhugin fyri at raðfesta, at tað skal vera eitt passaligt býti millum arbeiði og frítíð, vísir seg at vera í samsvari við svar uppá aðrar spurningar um familjuviðurskifti, sum verða viðgjørdir seinni í hesum partinum.

Enn eina ferð eru tað møguleikin at kunna arbeiða í heimbygdini/-økinum, og at arbeiðið er samfelagsgagnligt, ið verður raðfestur lægst. Tá sagt verður, at tey leggja størstan dent á at fáa góða løn, skal "góð løn" síggjast sum eitt relativt hugtak, og skal síggjast í mun til onnur ynski, tey hava til framtíðina. Nógvar gentur vóna t.d. at gerast frisørar, námsfrøðingar o.l., sum í vanligari fatan ikki eru "høgt" lønt størv. Ynskið um eina høga løn nýtist tí ikki at merkja annað enn ein vón um góða vælferð og rímilig livikor.

## Munur á gentum og dreingjum

Tað er rættiliga ymiskt, hvar ávikavist gentur og dreingir hava hug at arbeiða (hetta verður viðgjørt nærri í næsta parti). Men tá tað kemur til tey meiri

| Hvørja førleikagevandi útbúgving kundi tú hugsað tær? | | |
|---|---|---|
| | Tal | Prosent |
| Handil- og skrivstovuyrkið | 33 | 7,6% |
| Námsfrøðingur | 30 | 6,9% |
| Sjúkrarøktarfrøðingur | 30 | 6,9% |
| Hár- andlits- og kropsrøkt | 25 | 5,7% |
| Skipsførari, skipari, navigatørur | 24 | 5,5% |
| Mekanikari/teknikari (bil/flogfør) | 23 | 5,3% |
| Kokkur | 21 | 4,8% |
| Advokatur | 20 | 4,6% |
| Innan náttúru- og umhvørvi | 19 | 4,4% |
| Humanistisk kandidatútbúgving | 19 | 4,4% |
| Djóralækni og arb. við djórum | 18 | 4,1% |
| Innan tónleik/list (brúks,films vm.) | 17 | 3,9% |
| Innan maskin- og smiðjuyrkið | 16 | 3,7% |
| Fólkaskúlalærari | 16 | 3,7% |
| Handverkari (snikkari/timbur) | 15 | 3,4% |
| Lækni / tannlækni | 15 | 3,4% |
| Politistur / hermaður | 14 | 3,2% |
| Verkfrøðingur / arkitektur | 13 | 3,0% |
| Teldufrøðingur (KT o.a.) | 13 | 3,0% |
| Fjølmiðlafólk | 11 | 2,5% |
| Sniðgevi / grafiska yrkið | 9 | 2,1% |
| Fysio- og ergoterapeutur / massørur | 8 | 1,8% |
| Sálarfrøðingur | 7 | 1,6% |
| Elektrikari | 5 | 1,1% |
| Fiskivinnufrøðingur / tøkningur | 5 | 1,1% |
| Flogterna / flúgvileiðari | 5 | 1,1% |
| Flogskipari / tyrluskipari | 4 | 0,9% |
| Sosialráðgevi | 1 | 0,2% |
| N:436 | | 100,0% |

**Talva 1.1**
*Sp. Veitst tú, hvørja førleikagevandi útbúgving, ið tú helst kundi hugsað tær at farið undir?*

*Viðm.: N er í hesum føri 436, tí talan er um tey ungu, sum siga seg vita, hvat tey ætla sær at læra til*

almennu ynskini, so er munurin millum kynini ikki so stórur. Um hugt verður eftir, hvussu ymisku "starvseginleikarnir", ið tey ynskja av sínum framtíðarstarvi, sí mynd 1.3, verða raðfestir, so er lítil munur. Bæði kynini raðfesta teir individuellu fyrimunirnar hægst, meðan samfelagsatlitini verða raðfest lægri.

Fleiri dreingir hava tó víst á, at arbeiðið skal geva eina góða løn. Tað eru eisini fleiri dreingir, sum siga, at tað er týdningarmikið, at teir skulu kunna koma í hægri starv. Hinvegin eru fleiri gentur, sum vísa á, at starvið skal passa saman við teirra evnum og førleika - møguliga tí, at tær vilja vera vísar í, at tær megna starvið.

Hóast hetta, so merkir tað ikki, at genturnar ongar ambitiónir hava, tá ið tað kemur til teirra ynski til framtíðar arbeiðslívið. Tað eru nevniliga heldur fleiri gentur, sum hava víst á, at tað er týdningarmikið, "at arbeiðið gevur mær spennandi og krevjandi avbjóðingar". Tað eru tó eisini væl fleiri gentur, sum leggja dent á, at passaligt býti skal vera millum arbeiði og familjulív, sí mynd 1.4.

**Mest aktuellu útbúgvingarnar**

Helvtin av teimum ungu siga seg vita, hvørja førleikagevandi útbúgving tey ætla sær undir (um helvtin av bæði dreingjunum og gentunum) (sí t4.f2 og t5.f2).

Á talvu 1.1 sæst, hvørjar útbúgvingar tey ætla sær at fara undir. Útbúgvingarnar eru flokkaðar upp í 28 ymisk øki, hetta fyri at geva eina so útgreinaða mynd sum gjørligt. Eitt eyðkenni fyri valini er, at tað serliga eru útbúgvingar, ið kunnu takast í Føroyum, ið tey flestu eru áhugað í, t.d. handils- og skrivstovuyrkið, námsfrøðingar, sjúkrasystrar, útbúgvingar innan hár-, andlits- og kropsrøkt umframt skipara- og navigatørútbúgvingar.

Samanbera vit við spurningin um, hvar tey ungu helst vilja arbeiða í framtíðini, sum nærum øll hava svarað, so er gott samsvar ímillum ynski um arbeiði og val av útbúgving.

**Arbeiðs- og familjulív**

Kanningin vísir, at tey ungu eru ikki so samd um, hvussu tey vilja raðfesta arbeiði og familjulív, tá ið tey einaferð koma út á arbeiðsmarknaðin, sí mynd 1.4. Tey flestu vilja tó hava fastar arbeiðstíðir, so at bæði familjulívið og arbeiðslív kunnu leggjast í fastar karmar. Næst koma tey, sum ynskja stuttar arbeiðsdagar, so at nógv tíð verður til familjuna, og tey, sum vilja leggja arbeiðstíðina




**Mynd 1.4**
*Sp. Hvussu vónar tú, at arbeiðstíðirnar hjá tær skulu vera, tá tú hevur fingið familju (børn)?*

soleiðis til rættis, at tey sum foreldur kunnu vera heima. Leggja vit hesi bæði seinnu saman, eru tað rættiliga nógv (41 %) av teimum ungu, ið vilja raðfesta familjulívið ovarlaga. Serliga eru tað gentur, sum velja hesar loysnirnar, men áhugavert er, at dreingirnir eisini eru væl við.

At vera sjálvstøðugt vinnurekandi hevur ikki høgan prioritet millum tey ungu, og heldur ikki tankin um, at familjulívið má laga seg eftir arbeiðunum. Samanlagt kann sostatt sigast, at familjan verður raðfest ovarlaga.

Andsøgnin í hesum kann vera, at tey ungu vilja hava høga løn, samstundis sum tey raðfesta familjulívið og fastar karmar í arbeiðslívinum.

## Áhugi og dugnaskapur

Hóast vit nú vita, at næstan øll ungfólk fara at arbeiða fram ímóti at fáa sær eina útbúgving, er tað ikki øllum, sum dámar so væl at ganga í skúla. Sum talva 1.2 vísir, eru tað 40 % av gentunum og bara 28 % av dreingjunum, sum siga, at teimum dámar væl at ganga í skúla. Einum stórum parti av teimum ungu dámar nøkulunda at ganga í skúla. Harumframt er tað ein munandi partur av føroyska ungdóminum, sum beinleiðis hevur svarað, at teimum dámar illa ella sera illa at ganga í skúla.

Her sæst, at stórur munur er á gentum og dreingjum. Genturnar eru nógv positivari mótvegis skúlanum. Henda støða byggir møguliga undir pástandin um, at "skúlin ikki er fyri dreingir". At áhugin fyri skúlagongd bert er miðal stórur,

| Áhugin hjá ungum fyri skúlagongd? | | |
|---|---|---|
| | Gentur | Dreingir |
| Sera væl | 9% | 4% |
| Væl | 31% | 24% |
| Nøkulunda | 43% | 41% |
| Illa | 8% | 14% |
| Sera illa | 9% | 16% |
| | | N=879 |

**Talva 1.2**
*Sp. Hvussu dámar tær at ganga í skúla?*

| Hvussu væl umtóktar eru ymsu lærugreinirnar? | | | |
|---|---|---|---|
| **Best umtókt** | | **Ringast umtókt** | |
| Ítróttur | 22% | Alis/evnafrøði | 20% |
| Støddfrøði | 17% | Støddfrøði | 18% |
| Føroyskt | 13% | Týkst | 19% |
| Enskt | 12% | Danskt | 9% |
| Handverk/list | 9% | Søga/samtíð | 7% |
| Alis-/evnafrøði | 7% | Ítróttur | 6% |
| Søga/samtíð | 5% | Lívfrøði | 5% |
| Lívfrøði | 4% | Landalæra | 5% |
| Danskt | 4% | Føroyskt | 5% |
| Landalæra | 2% | Enskt | 4% |
| Týskt | 2% | Handverk/list | 2% |
| Annað | 3% | Annað | 1% |
| | N:849 | | N: 839 |

**Talva 1.3**
Sp. Hvørja lærugrein dámar/dámdi tær best/ringast í fólkaskúlanum

kann grundast á, at næmingarnir eru skúlatroyttir í 9. flokki.

Sum heild trívast næmingarnir í miðnámsskúlunum munandi betur enn teir, sum ganga í fólkaskúla (sí t6.f2). Orsøkin er helst tann, at tað serliga eru næmingar, sum trívast rímiliga væl í skúlanum, sum fara undir eina miðnámsskúlaútbúgving. Afturat hesum er tað eisini í størri mun teirra egna val.

Hyggja vit at skúlaviðurskiftum annars, eitt nú karakterum, so er miðalkarakterurin hjá flestum næmingum millum 8 og 9. Talið á teimum, sum liggja hægri enn hetta, er sera lítið, og genturnar fáa betri skoðsmál enn dreingirnir (sí t7.f2).

Viðvíkjandi lærugreinunum, sí talvu 1.3, er ítróttur best umtóktur, næst kemur støddfrøði, og síðani føroyskt. Býtið millum gentur og dreingir er eisini ógvuliga greitt. Tað er dreingjunum, sum dámar best ítróttur, næst hjá teimum er støddfrøði og alis- og evnafrøði. Nógvar gentur halda, at føroyskt er tann besta lærugreinin, næstflest halda støddfrøði vera bestu lærugreinirnar, og á triðja plássi er ítróttur. Tríggjar tær ringast dámdu lærugreinarnar eru alis- og evnafrøði, støddfrøði og týskt.

### Hvat gera tey í frítíðini?

Fyri at fáa eina heildarmynd av føroyskum ungdómi hevur tað týdning at vita, hvat tey gera í frítíðini. Hetta, tí frítíðin er ein stórur partur av teirra gerandisdegi, og er tí við til at evna teirra hugburð, og ávirkar sostatt tey valini tey gera.

Tað er greitt sambært kanningini, sí talvu 1.4, at føroyskum ungdómi dámar best at lurta eftir tónleiki og at hyggja at filmi. Næst kemur ítrótturin, síðani lesa tey bøkur og bløð og gera skúlating. Politiskt virksemi er tað, ið fæst ungfólk javnan fáast við.

| Hvat gera tey í frítíðini ? | | |
|---|---|---|
| | Gentur | Dreingir |
| Tónleikur og filmar | 65% | 58% |
| Ítrótt | 46% | 63% |
| Lesa bøkur og bløð, gera skúlating | 55% | 30% |
| KT (telduspøl, alnet o.l) | 16% | 55% |
| Andalig virksemi | 21% | 15% |
| Handaligt ítriv (handarbeiði, tekna, smíða) | 22% | 7% |
| Bilar, knallertir, o.l | 4% | 28% |
| Útilív(ganga í hagan, skóta virksemi o.l) | 14% | 12% |
| Fiska, sigla o.l | 1% | 19% |
| Ekstrem-sport (skateboard, rulluskøjtur osfr.) | 6% | 12% |
| Politiskt virksemi | 3% | 6% |

**Talva 1.4**
Sp. Hvørji frítíðarítriv íðkar tú javnan? (Tú kanst seta fleiri krossar) N=899

Her sæst, at føroyskur ungdómur á mangan hátt tekst við tey somu tingini, sum ungdómar aðrastaðni, tvs. sær teir somu filmarnar, áhugin fyri ítrótti o.s.fr. Í so máta eru tey vorðin "global" í sínum frítíðarvali, meðan tey "lokalu" ítrivini

(t.d. útilív, fiska) ikki fáa so høga raðfesting.

**Samleiki, hugburður og eginleikar**

Arbeiði og útbúgving hava alstóran týdning fyri samleikan hjá hvørjum einstøkum. Ofta er tað soleiðis, at fyrstu ferð, ein hittir eitt fremmandafólk, verður ein spurdur: hvat gert tú? Ella: hvat ert tú?

Krøvini til at skapa sín egna samleika eru økt nógv, so hvørt sum gongdin í samfelagnum hevur havt við sær, at fólk gerast leysari av gomlum normum, siðvenju og samfelagsligum bindingum. So ungdómurin skal finna sítt pláss í einum alsamt meira fjøltáttaðum samfelag í støðugari broyting. Øll viðurskifti krevja ”persónliga” støðutakan, og fótasporini at fylgja eru fá - tey skulu velja útbúgving, arbeiði, bústað, tónleik, forbrúk, fyrimyndir og lívsstíl.

Persónligir eginleikar og virði eru tengd at sosialiseringsprosessini hjá hvørjum einstøkum menniskja. Tey virði, ein hevur, speglast aftur í atferð og hugburði til nærum øll viðurskifti í lívinum, umframt at tey verða sett sum mát fyri, hvat ynskiligt er fyri atferð hjá øðrum. Tí er spurningurin um samleika, hugburð og eginleikar eisini áhugaverdur í sambandi við spurningin um rekruttering til fiskivinnuna.

Kanningin vísir, sum nevnt, at tey ungu, í stóran mun taka støði í sær sjálvum, tá tey taka avgerðir um framtíðina. Hetta sama vísir seg eisini at vera galdandi, tá ið tey skulu taka eina avgerð, sí mynd 1.6. Tey allarflestu gera “tað, ið tey innast inni føla er rætt fyri tey”. Hetta merkir, at støðutakanin byggir á virði og normar, sum tey kensluliga meta sum sínar heilt persónligu. Nøkur velja eftir, hvat ið tey “tíma best”. Hetta er ein meira sjálvsøkin hugburður, har hugurin er drívmegin. Og fæst (20%) gera tað, tey fáa mest burturúr, sum er eitt rationelt útgangsstøði, bygt á hugsan um, hvat og hvar mest fæst burturúr persónliga og/ella fíggjarliga.

Av persónligum eginleikum, ið tey ungu flest meta sum serliga týdningarmiklar, eru trúfesti, tolsemi og sjálvsálit hægst mett, sí mynd 1.7.

Trúfesti er eitt hugtak, tey flestu kenna sum ein positivan eginleika, frá teirra barnalærdómi, ella kristindómi, og tað hevur óivað gjørt, at tey flestu hava mett hetta hægst.

Aftan á trúfesti kemur tolsemi. At hetta er so høgt í metum, hevur møguliga ein goymdan boðskap í sær, tí ung ofta sakna tolsemi frá teimum vaksnu í ungdómsárunum. Av øðrum eginleikum, ið tey ungu eru samd um, eru sjálvsálit, lívligheit og uppfinnsemi. Møguliga eru hetta eginleikar, tey ungu meta seg sjálvi at hava, og seta tí prís uppá hesar somu eginleikar hjá øðrum.

Ungdómurin setur sum fyrsta krav, tá talan er um samveru og samstarv við onnur, at tað er stuttligt. Men samveran og samstarvið skal eisini vera merkt av samanhaldi, vera hugkveikjandi og opið, hetta sæst á mynd 1.8.

Enn eina ferð kunnu vit staðfesta, at tað góða lívið verður raðfest ovast. Tað er ikki einum og hvørjum, tey ungu vilja vera saman við. Tað skal vera stuttligt, samanhaldið skal vera gott og samstundis hugkveikjandi. Samanbera vit hetta við krøvini, tey seta til arbeiðið, so eru tey krøvini innan somu kategori, tað er, at arbeiðið skal vera spennandi, ein avbjóðing og passa til evnini og førleikan hjá tí einstaka.

Samanlagt kunnu vit siga, at hugtøk sum at “noyðast at arbeiða” ella “taka tað arbeiði, sum nú einaferð er at fáa”, ikki samsvara við hesi nevndu krøv hjá ungdóminum. Vit vita tó einki um, hvussu væl tað eydnast teimum at fáa hesi ynski og krøv uppfylt. Hvussu leingi, tey halda fast við krøvini, er eisini ilt at meta um.

Fyri vinnulívið er tað ein sera umráðandi kunnleiki at hava, at tey ungu sum arbeiðsorka




N=867

**Mynd 1.6**

*Sp. Tá ið tú skal taka eina avgerð, hvat leggur tú størstan dent á?*

fegin taka avbjóðingar og hugkveikjandi møguleikar til sín – og at tey ungu leggja stóran dent á tað sosiala umhvørvið, sum t.d. samanhald, opinleika og trúnað, og at "tað skal vera stuttligt".

**Bjartskygni og sjálvsálit**

Í svarunum hjá teimum ungu, m.a. um ynskini til útbúgving og arbeiði, kunnu vit staðfesta, at tey seta stór krøv til sín sjálvan og framtíðina. Men hóast hesi høgu krøvini, so metir væl oman fyri ein helvt av teimum, at tey fáa møguleika at arbeiða við tí, tey hava hug til (sí t8.f2). Hetta kann ikki annað enn tulkast sum bjartskygni. Tey eru bert nøkur fá, sum halda, at tað ikki er so sjálvsagt at røkka teimum málum, ið verða sett.

Sum nevnt eru tey ungu rættiliga miðvís og hugsa nógv um framtíðina (sí t9.f2). Um helvtin av teimum siga, at tey í stóran mun hugsa um, hvat tey skulu gera í framtíðini, meðan meiri enn ein triðingur í ein ávísan mun hugsar um hetta.

**Bústaður, útbúgving og vinna**

Føroyskir ungdómar hava stórar vónir til framtíðina og útbúgving verður sæð sum ein máti at fáa fleiri persónligar fyrimunir. Eyðsæð er, at ein stórur partur av teimum ungu noyðast at flyta fyri at taka útbúgvingina, men hetta er í sær sjálvum ikki ein trupulleiki. Koma tey aftur, hava tey ofta við sær nýggjar førleikar, royndir og hugskot, ið eru avgerandi fyri framhaldandi lokala menning og trivnað.

Hóast fá ung leggja dent á heimbygdina í útbúgvingarvalinum, so vilja nógv teirra helst búgva í heimbygdini eftir lokna útbúgving. Hetta kann tykjast sum ein andsøgn, men kann eisini tulkast sum, at um tað ber til at fáa ynskini til

**Hvørjar persónligar eginleikar seta tey ungu hægst?**




N=778

**Mynd 1.7**
*Sp. Set kross við teir persónligu eginleikarnar, ið tú metir hægst*

framtíðar starvið uppfylt í heimstaðnum, so vilja nógv fegin búseta seg har. Hetta setur uttan iva stór krøv til bæði arbeiðsmarknaðin og møguleikarnar hjá fólki at trívast í økinum.

Á Mynd 1.9 síggja vit, at umleið 25 % hava svarað, at tey ógvuliga fegin vilja búgva í heimbygdini eftir lokna útbúgving. Harumframt vóru tað um 33 %, sum hildu, at tey kundu væl hugsað sær at búð í heimbygdini, um tað bar til, t.d. viðvíkjandi arbeiði. Hetta merkir, at tað eru rættiliga nógv – um 60 % - sum kundu hugsað sær at búð í heimbygdini í framtíðini. Einans 10 % siga beinleiðis, at tey ikki kundu hugsað sær at búð í heimbygdini í framtíðini. Tað er hugvekjandi, at tað eru munandi færri gentur enn dreingir, sum hava hug at búgva í heimbygdini. Og tilsvarandi eru munandi fleiri gentur (16 %) enn dreingir (6 %), sum beinleiðis siga, at tey ikki kundu hugsað sær at búð í heimbygdini.

**Útheimurin dregur**

Hyggja vit at teimum ungu sum ivast, hvar hann ella hon vil seta búgv, tá tey eru liðug við útbúgvingina, er talan um umleið ein triðing av føroyska ungdóminum. Hetta er galdandi fyri tey ungu um alt landið – tað vil siga, at eisini í teimum størru plássunum eru nógv, sum ivast í spurninginum um, hvørt tey kundu hugsað sær at búð í heimbygdini eftir tað, at tey hava nomið sær útbúgving.

Á mynd 1.10 sæst, at meiri enn ein triðingur av øllum gentunum siga, at tær ynskja at búgva í útlondum eftir tað, at tær eru lidnar at útbúgva seg. Hetta kann takast sum eitt tekin til føroyska samfelagið um, at tað ikki er nóg áhugavert fyri ein munandi part av føroyskum konufólkum.




**Mynd 1.8**

*Sp. Hvørji krøv setur tú til samveru og samstarv við onnur? (Brúka tølini 1,2 og 3 til tínar raðfestingar - 1 fyri kravið, tú setir fremst o.s.fr.) At tað er:*

Konufólk hava vanliga størri trupulleikar av teimum keðiligu síðunum við at búgva á lutfalsligum smáum plássum, sum bæði bygdirnar og býirnir í Føroyum mugu sigast at vera. Eisini riggar bygdatilveran betur til mannfólk við tað, at fleiri arbeiðs- og frítíðaruppgávur eru til menn enn til konufólk (seyður, útróður v.m). Tá harumframt verður hugsað um, at konufólk í løntari vinnu arbeiða í tænastuvinnunum, og at tey mest áhugaverdu av hesum størvum ofta eru á størri plássum, er støðan hjá konufólkunum ein serlig avbjóðing fyri økismenningina.

Tá bústaðarvalið hjá ungdóminum í stóran mun er tengt at útbúgving og arbeiðsmarknaðinum, er tað avgerandi fyri vinnuna m.a. í útjaðaranum at føra seg fram í kappingini um at vera áhugaverd og fakliga nøktandi arbeiðspláss.

## Samanumtøka

Vit hava í hesum partinum sæð, at næstan øll tey ungu ætla at fáa sær eina útbúgving, og at tey sum heild hava stórar vónir til, at útbúgving kann geva teimum eina røð av persónligum fyrimunum. Tað er eisini greitt, at tað eru serliga teir persónligu fyrimunirnir, sum liggja teimum fremst í huganum, meðan tey meiri samfelagsligu atlitini verða raðfest lægri.

Tá talan er um sjálvt valið av útbúgving, vilja tey leggja dent á, at útbúgvingin kann geva teimum góða inntøku, fakligar avbjóðingar, og at hon er stuttlig. Tey flestu ungu vilja leggja dent á, at tey fáa góða løn, at starvið passar til teirra evni og førleika, og at arbeiðið fer at geva teimum spennandi avbjóðingar. Tað, sum fæst leggja dent á, er at tey kunnu: "arbeiða í heimbygdini/-økinum", meðan svarmøguleikin at "arbeiðið er samfelagsgagnligt" hevur næstlægstu undirtøku.

Ungdómstilveran er í stóran mun knýtt at skúla og frítíð, og tí hevur hesin parturin av ungdómslívinum ávirkan á valini, sum ungdómurin ger á sínari lívsleið. Teimum flestu dáma "nøkunlunda" at ganga í skúla, og tað er ítróttur, sum er best umtókta lærugreinin. Men fakini støddfrøði og føroyskt fáa eisini góð skoðsmál. Frítíðin er greitt myndað við tónleiki, filmi og ítrótti, men tó so, skúlating og at lesa liggur sum nr. 3. á listanum. Hetta kann tulkast soleiðis, at hóast ungdómurin hevur ognað sær ein modernaðan lívsstíl, har ítróttur, tónleikur og filmur fylla nógv í tilveruni, so verður fakligur førleiki raðfestur ovarlaga. Hetta skulu vit aftur síggja sum ein part av ynskinum hjá ungdóminum um eina famtíð,




N=884

**Mynd 1.9**
*Sp. Ynskir tú at búseta teg í tínari heimbygd/heimbýi, tá ið tú ert (heilt) liðug/ur at útbúgva teg?*




N=833

**Mynd 1.10**
*Sp. Um tú ikki heldur, at tú kemur at búgva í tínari heimbygd/heimbýi, tá tú ert liðug/ur at útbúgva teg, hvar ynskir tú so at búgva?*

har tey sjálvi seta dagsskránna.

Tey ungu leggja dent á sosialan trivnað, og hugtøk sum sjálvsálit, trúfesti, samanhald og at hava tað trygt og stuttligt eru millum tey virði, ið tey seta høgt, tá talan er um samstarv og samveru við onnur. Og skulu vit lýsa teirra hugburð til framtíðina, fáa vit eina greiða ábending um, at tey vilja raðfesta soleiðis: fastar arbeiðstíðir, fyri at arbeiðslív og familjulív kunnu leggjast í fastar karmar, stuttar arbeiðsdagar og at nógv tíð verður til familjuna. Hetta kann tykjast at vera í andsøgn við kravið um høga løn og avbjóðingar

í arbeiðslívinum, sum eisini eru millum teirra ynski um eitt framtíðarstarv.

Tey ungu eru bjartskygd, og hóast tey hugsa nógv um, hvat starv tey skulu hava í framtíðini, so eru tey rættiliga vís í, at tey sleppa at arbeiða við tí, tey helst vilja. Møguleikin at arbeiða í heimbygdini tykist ikki at vera nakað, sum verður raðfest høgt, tá ið ræður um, hvørja útbúgving, tey velja sær, harafturímóti hava tey ein ávísan áhuga í at búgva í heimbygdini eftir lokna útbúgving. Ungdómurin hugsar fyrst og fremst um at skapa sær sína egnu persónligu tilveru – atlitini til heimbygdina og tey samfelagsligu atlitini sum heild koma í aðru røð. Hetta merkir tó ikki tað sama, sum at tey ungu eru sjálvsøkin, men heldur at teirra samfelagsliga virksemi og atlit er undir broyting.

# 2.partur

## Tey ungu og fiskivinnan

Í hesum partinum fara vit at hyggja nærri at, hvar tey ungu helst vilja arbeiða, og serliga taka atlit til, hvat tey halda um fiski- og alivinnuna. Hava tey ungu roynt seg í fiskivinnuni, og hvussu hava tey trivist har, og halda tey, at eitt starv í fiskivinnuni kann vera nakað fyri tey.

### Royndir og kunnleiki

Tey ungu hava grundleggjandi ein positivan hugburð til fiskivinnuna. Heili 85% halda, at fiskivinnan er framtíðarvinnan hjá Føroyum, meðan bert 1% hevur svarað, at fiskivinnan als ikki hevur nakra týdningarmikla framtíð, sí mynd 2.1.

Tey ungu hava fortreytir fyri at gera grundaðar metingar av viðurskiftum, ið snúgva seg um arbeiði sum heild, og um fiskivinnu sum arbeiðspláss. Tí ein stórur meiriluti av teimum - 85% - sigur seg kenna onkran væl, sum arbeiðir í fiski- og alivinnuni. Næstan øll hava sjálv havt lønt arbeiði (93%), meðan meir enn 50% hava roynt arbeiði í fiskivinnuni í styttri og longri tíðarskeiði, sí talvu 2.1.

Hetta merkir, at nógv ung vita, hvat arbeiðslívið inniber. Gjøgnum egnar royndir, og gjøgnum fólk, tey kenna, hava tey eitt ávíst innlit í, hvussu tað er at arbeiða í fiskivinnuni (í øllum førum pørtum av fiskivinnuni). Hetta merkir, at nógv ung vita, hvat tey tosa um, tá ið tey úttala seg um fiskivinnuna. Og hóast nógv teirra leita ímóti øðrum útbúgvingum/arbeiði, so eru tey framvegis medvitandi um viðurskiftini í fiskivinnuni.

Tað vísir seg, at tey flestu hava sínar starvsroyndir innan fiskivinnuna, færri innan alivinnuna.

**Kennskapur og arbeiðsroyndir**

| Kennir tú nakran væl, sum arbeiðir innan fiski-/alivinnuna | |
|---|---|
| Ja | 84,9% |
| Nei | 15,1% |
| | N=830 |

| Hevur tú nakrantíð havt lønt arbeiði? | |
|---|---|
| Ja | 93,2% |
| Nei | 6,8% |
| | N=884 |

| Hevur tú arbeiði aftan á skúlatíð? | |
|---|---|
| Ja | 59,8% |
| Nei | 40,2% |
| | N=871 |

| Hevur tú arbeitt innan fiski- og alivinnuna? | | | |
|---|---|---|---|
| | Gentur | Dreingir | Tilsamans |
| Ja | 42,8% | 62,2% | 51,7% |
| Nei | 57,2% | 37,8% | 48,3% |
| | | | |

**Talva 2.1** N=859

Hetta er natúrligt, tí nógv fleiri størv eru í fiskivinnuni. Tað er serliga á fiskavirkjunum, at nógv hava roynt seg (uml. 30%). Harumframt hava umleið 20% egnt og líknandi, 12% hava verið til skips, og 7% hava róð út. Munandi færri hava roynt seg í alivinnuni – 2,4% hava arbeitt á kryvjivirki, 3% á alibrúki og 3,7% hava starvast á smoltstøð.




N=844

**Mynd 2.1**
*Í hvønn mun tekur tú undir við hesum pástandum ? Fiskivinnan er framtíðarvinnan í Føroyum*

**Hvar vilja føroyskir ungdómar arbeiða?**
Hvørjar vinnur kunnu best liva upp til krøv og ynski hjá ungdóminum um framtíðar arbeiði, og hvar vilja tey helst arbeiða?

Tær natúrligu bindingarnar at einum ávísum staði ella vinnu eru ikki til staðar longur. Orsøkirnar eru, at samfelagsskipanin, sum vit nevna ídnaðarsamfelagið, er í broyting. Í dag tosa vit um, at samfelagið er eitt postídnaðarsamfelag, har tey flestu fólkini arbeiða við persónsrættaðum tænastuvirksemi (t.d. læknar, lærarar, frisørar v.m.) ella sokallað "symbolarbeiði" (gransking, telduvirksemi v.m.). Føroyar eru onki undantak í hesari gongdini. Ein ábending um, hvussu henda gongdin ávirkar ungdómin og ynskini, ungdómurin hevur, fæst við at hyggja at mynd 2.2. Myndin vísir, hvar ungfólk ímynda sær, at tey helst vilja arbeiða í framtíðini. Næmingarnir vórðu bidnir um at velja tær tríggjar vinnurnar, har teir helst kundu hugsað sær at arbeitt. Tey fingu 21 møguleikar at velja ímillum.

Tað vísir seg at vera tænastuvinnurnar, ið eru mest lokkandi. Tær vinnurnar, har flest ung kundu hugsað sær at arbeitt, eru: Frisør, andlits- og kropsrøkt, tónleikur, mentan ella list, sakførari og grannskoðan, heilsu- og almannaøkið og hotell/matstovu/ferðavinna. Tær vinnurnar, sum eru ringast umtóktar, eru landbúnaður (2,6%), almenn umsiting (2,6%), ídnaðar- og framleiðsluvinna (2,7%), alivinnan (2.9%), flutningsvinnan (3,1%)




**Mynd 2.2**
*Sp. Niðanfyri er ein listi við ymiskum vinnum. Innan hvørjar vinnur kundi tú helst hugsað tær at arbeitt? (Brúka tølini 1,2 og 3 til tínar raðfestingar—1 fyri tað, tú best kundi hugsað tær, 2 fyri næstbest og 3 fyri triðbest)*

og fiskivinnan á landi (3,2 %). Tað eru sostatt lutfalsliga fá ung, sum hava hug at arbeiða innan ráevnis- og framleiðsluvinnurnar, harímillum eru alivinnan og fiskivinnan á landi.

Ynskini hjá ungdóminum samsvara rættiliga væl við verandi vinnubýtið í Føroyum. Sum sagt vil ein stórur partur av teimum ungu helst sleppa at arbeiða innan tænastuvinnurnar. Og tað er eisini ein stórur partur av føroyingum, sum arbeiða í tænastuvinnunum. Vinnubýtið mált í løngjaldingum var soleiðis í 2002 (Árbók fyri Føroyar 2003)

- 59,2% av samanløgdu løngjaldingunum í Føroyum vórðu goldnar til starvsfólk í tænastuvinnunum (3.vinna)[1] - tilsamans 3. 563,6 mio.kr.
- 19,1% - tilsamans 1.151,3 mio.kr. - vórðu útgoldnar til fólk, sum starvaðust innan framleiðsluvinnurnar (2.vinna) [1] og
- 20,5% - tilsamans 1.233,4 mio.kr - av teimum samanløgdu løngjaldingunum í 2002, vórðu útgoldnar í vinnunum, sum verða róptar ráevnisvinnurnar (1.vinna)[1], harav er fiski_ skapur tann størsti parturin.

**Kynsbýtið**

Tað er ógvuliga kynsbundið, hvar ávikavist kvinnur og menn arbeiða. Kynsbýtið sæst í sambandi við lønarútgjaldingar í ymiskum vinnum. Til dømis vórðu 98 % av lønunum innan fiskiskap í 2002 goldnar til menn, meðan 2 % vórðu goldnar




**Mynd 2.3**

Sp. Sp.: Niðanfyri er ein listi við ymiskum vinnum. Innan hvørja vinnu kundi tú helst hugsað tær at arbeitt? (Brúka tølini 1,2 og 3 til tínar raðfestingar – 1 fyri tað tú best kundi hugsað tær, 2 fyri næstbest og 3 fyri triðbest.

**Nota 1:**
1.vinna fevnir um vinnugreinarnar: Landbúnaður, Fiskiskapur, Ali- og kryvjivirki og Ráevnisvinna. 2.vinna fevnir um vinnugreinarnar: Fiskavøruídnaður,Skipasmiðjur/smiðjur, Framleiðsla annars, Bygging, Orkuveiting. 3.vinna fevnir um vinnugreinarnar: Handil og umvæling, Gisting og matstovur, Sjóflutningur, Flutningur annars, Postur, fjarskifti, Fígging og trygging, Vinnuligar tænastur, Húshaldstænastur, Almenn fyrisiting o.a., Undirvísing, Heilsu- & almannaverk, Felagsskapir.

til kvinnur. Innan vinnuna skipasmiðjur, smiðjur vórðu 93% av lønunum útgoldnar til menn og 7% til kvinnur. Hinvegin eru kvinnurnar í stórum meiriluta innan vinnugreinirnar heilsu og almannaverk – har vórðu 81% av lønunum goldnar til kvinnur og 19 % til menn (Árbók fyri Føroyar, 2003).

## Hvar vilja føroyskar gentur arbeiða?

Tá ið vit viðgera spurningin um, hvar føroyski ungdómurin best kundi hugsað sær at arbeitt, ber ikki til at viðgera ungdómin undir einum. Kvinnur arbeiða fyrst og fremst innan tænastuvinnurnar. Í 2002 vórðu heili 83% av lønunum útgoldnar til kvinnur, goldnar innan tænastuvinnurnar, meðan 14% vórðu goldnar innan framleiðsluvinnurnar og einans 3% innan ráevnisvinnurnar (Árbók fyri Føroyar 2003, s.95).

Kanningin vísir eisini, at føroyskar gentur eisini hava bestan hugin at arbeiða innan tænastuvinnurnar. Á mynd 2.3 sæst, hvar gentur hava hug at arbeiða. Ovast liggja vinnurnar 1. Frisør og andlits- og kropsrøkt, 2. Heilsu og almannaøkið og 3. Hotell/matstova/ferðavinna. Hareftir kemur ein long røð av vinnum, sum eisini kunnu bólkast undir tænastuvinnurnar. Men vit síggja eisini, at ymsu partarnir av fiskivinnuni ikki eru serliga høgt í metum og koma inn sum nummar 15 (fiskiskapur 2,7%), 18 (fiskivinnan á landi 1,7%) og 20 (alivinnan 1,4%). Ongin verulig siðvenja er í Føroyum fyri, at kvinnur eru til fiskiskap. Tað er tí natúrligt, at einans fáar gentur kunnu hugsa sær at gerast "fiskimenn". Men meðan næstan ongar kvinnur eru til fiskiskap, so arbeiða nógv




**Mynd 2.4**

*Sp. Sp.: Niðanfyri er ein listi við ymiskum vinnum. Innan hvørja vinnur kundi tú helst hugsað tær at arbeitt? (Brúka tølini 1,2 og 3 til tínar raðfestingar – 1 fyri tað, tú best kundi hugsað tær, 2 fyri næstbest, og 3 fyri triðbest.*

konufólk í fiskivinnuni á landi. Í 2001 arbeiddu meir enn 1200 konufólk í fiskivinnuni á landi (sambært fiskavirkisskipanini hjá ALS). Hóast hetta, so eru tað færri enn 2% av gentunum, sum hava svarað, at tær kundu hugsað sær at arbeitt í fiskivinnuni á landi.

Nógv fiskavirkir á landi hava seinnu árini havt trupulleikar við at fáa nóg mikið av starvsfólki. Henda kanningin stuðlar undir hesum, tí fiskivinna á landi er millum tær vinnur, har fæstar gentur hava áhuga fyri at arbeiða. Viðmerkjast kann í hesum sambandi, at bert fá konufólk hava leiðarastørv í fiskivinnuni á landi – størv, sum undir øllum umstøðum eru meiri lokkandi, tá ið tað kemur til løn og arbeiðsuppgávur. Hetta hevur við sær, at fáar kvinnuligar fyrimyndir eru hjá gentum, tá ið tað kemur til góð størv í fiskivinnuni.

Eisini alivinnan er millum tær vinnur, har fæstar gentur kundu hugsað sær at arbeitt (1,4%). Hetta er eisini ein vinna, har ein stórur meiriluti av starvsfólkunum eru mannfólk. Í 2002 vóru 80 % av lønunum útgoldnar til mannfólk, meðan einans 20% vórðu goldnar til konufólk (Árbók fyri Føroyar 2003).

## Hvar vilja føroyskir dreingir arbeiða?

Á mynd 2.4 sæst, at tann vinnugreinin, har flestir føroyskir dreingir kundu hugsað sær at arbeitt, er fiskiskapur. Hetta má sigast at vera rættiliga positivt fyri føroysku reiðaravirkini, at so mikið nógvir føroyskir dreingir halda tað vera lokkandi at gerast fiskimenn. Tað er helst ikki nakað nýtt fyri flestu útgerðarfeløgini, tí nógv teirra hava bíðilistar við ungum dreingjum, sum vilja sleppa at royna seg á sjónum. Hinvegin vísir myndin eisini, at fiskivinnan á landi ikki er eins væl umtókt millum dreingirnar. Einans um 5 % av dreingjunum eru áhugaðir at arbeiða í fiskivinnuni á landi. Støðan er líknandi, tá ið ræður um alivinnuna. Bert 5% av dreingjunum siga seg vera áhugaðar at arbeiða innan hesa vinnuna.

Byggivinnan er tann næstbest umtókta vinnan millum føroyskar dreingir. Tann vinnan, har triðflestir dreingir kundu hugsað sær at arbeitt, er innan ítrótt (sum fulltíðar ítróttarfólk). Tað er helst ikki nakað nýtt, at ungfólk kunnu hugsa sær at vera professionel ítróttarfólk (sí Forchammer, 1997). Hetta er ítrivið hjá nógvum ungfólkum, og tí kunnu tey hugsa sær at arbeiða innan hesa vinnuna. Ítrótturin er eisini nógv í brennideplinum og gevur stóra viðurkenning. Seinnu árini

**Hvørji størv innan fiskiskap kundu tey ungu helst hugsað sær?**




**Mynd 2.5, a.**

**Hvar í fiskivinnuni á landi kundu tey ungu helst hugsað sær at arbeitt?**




**Mynd 2.5, b.**

**Hvørji størv í alivinnuni kundu tey ungu helst hugsa sær?**




**Mynd 2.5, c.**

*SP. Um tú skuldi arbeitt í fiskivinnuni, hvar hevði tað so verið?*

hava eisini verið fleiri føroyingar, sum hava arbeitt sum fulltíðar ítróttarfólk. Sostatt er møguleikin fyri at arbeiða innan ítrótt vorðin ein meiri veruleikakendur møguleiki hjá føroyskum ungfólki, samanborið við t.d. fyri 10-15 árum síðani. Tað er vert at leggja til merkis, at tað eru munandi færri gentur, sum halda tað vera lokkandi at hava ítrótt sum starv.

**Hvørji størv í fiskivinnuni eru mest áhugaverd?**

Í kanningini varð spurt, hvat tey helst høvdu valt, um tey skuldu arbeitt í fiskivinnuni, sí mynd 2.5 a, b og c. Sum vit hava sæð frammanfyri, hava nógv av teimum ungu ongar beinleiðis ætlanir um at arbeiða í ali- og fiskivinnuni. Men myndin gevur hóast tað ábendingar um, hvørji størv verða mett at vera tey bestu og mest lokkandi.

Innan alivinnuna eru tað størvini sum stjóri/virkisleiðari umframt sølu- og marknaðarfólk, sum hava størstan áhuga. Tað eru um 10%, sum siga seg vera áhugað í einum tímaløntum starvi, men fá eru tey, sum halda, at eitt starv sum fóðrari hevði verið áhugavert fyri tey.

Myndin er rættiliga lík, tá tey ungu svara, hvar í fiskivinnuni á landi tey helst kundu hugsað sær at arbeitt. Eisini í hesari vinnuni kundu flest hugsað sær at arbeitt sum stjóri/virkisleiðari ella sølu- og marknaðarfólk.

Innan fiskiskap eru tað størvini sum skipari ella stýrimaður, sum flest halda vera áhugaverd. Men tey eru eisini nógv, sum halda, at eitt starv sum kokkur kundi verið spennandi at roynt.

Samanumtikið ber til at siga, at tað serliga eru leiðara- og marknaðarstørvini, sum hava áhuga millum tey ungu. Tað er ikki annað enn natúrligt, tí serliga hesi størvini liva upp til ynskini, tey ungu hava til teirra framtíðarstarv - t.e. góða løn og avbjóðingar.

**Gransking og tøknimenning**

Í Føroyum er eitt ávíst tal av størvum innan fiskivinnugransking og menning á t.d. Fiskirannsóknarstovuni, Heilsufrøðiligu Starvsstovuni og innan tøknimenning t.d. á skipasmiðjunum, P/F KJ-Hydraulik, P/F FJM í Runavík, P/F Formula.fo, P/F NomaTek í Havn og P/F Injector International í Vági. Í kanningini varð spurt, um næmingarnir høvdu verið áhugaðir fyri tílíkum størvum. Áhugin fyri hesum var ikki so stórur. Einans uml. 10% søgdu beinleiðis, at tey helst høvdu verið áhugað. Men hóast hetta so vóru tað um 50%, sum vístu á, at tey møguliga høvdu verið áhugað fyri einum slíkum starvi. Aftur her vóru fleiri dreingir, sum vístu hesum møguleikanum áhuga. Næstan 70% av dreingjunum søgdu seg vera áhugaðar, meðan ein lítil triðingur segði seg ongan áhuga hava (sí t10.f2).

Millum genturnar var støðan øðrvísi, ein lítil helvt læt upp fyri hesum møguleikanum, men ein góð helvt vísti honum aftur.

**Hvussu trívast tey í fiskivinnuni?**

Frammanfyri varð víst á, at 85 % av ungdóminum siga seg kenna onkran væl, sum arbeiðir í fiskivinnuni. Og umleið helvtin hevur konkretar starvsroyndir innan fiskivinnuna, sum Talva 2.1 eisini vísti.




**Mynd 2. 6**

*Sp. Hvussu dámdi tær sum heild at arbeiða innan fiskivinnuna?*




**Mynd 2.7**
*Sp. Hvussu dámdi tær sum heild at arbeiða innan fiskivinnuna? og um ja, hvar í fiskivinnuni hevur tú arbeitt?*

Á mynd 2.6 sæst, at ein stórur meiriluti av teimum, sum hava roynt seg í fiskivinnuni – út ímóti 80% – hava dámt nøkulunda ella gott tað arbeiðið, tey høvdu. Umleið fimti hvør hevði ringar royndir.

Allarflestu dreingir tykjast at trívast væl í fiskivinnuni. Næstan 85% av dreingjunum hava havt tað nøkulunda ella gott, og einans 15% hava trivist illa. Hetta má sigast at vera rættiliga positivt, og átti at verið eitt gott grundarlag hjá vinnuni at bygt víðari á.

Hinvegin er støðan ein heilt onnur, tá tað kemur til genturnar. Tað eru nevniliga nógv færri gentur, sum hava trivist væl í fiskivinnuni. Meðan meiri enn helvtin av dreingjum siga, at teir trivust væl í fiskivinnuni, so er tað einans fjórða hvør genta, ið hevur positivar royndir. Og meðan tað eru 15% av dreingjunum, sum hava trivist illa, so eru tað 27% av gentunum.

Tað er sostatt ógvuliga ymiskt, hvussu gentur og dreingir trívast í fiskivinnuni. Ein orsøk til, at tað er so ymiskt, hvussu gentur og dreingir trívast, er helst, at tað er rættiliga ymiskt, hvørjar arbeiðsuppgávur tey fáa.

Arbeiðsbýtið í fiskivinnuni á landi er rættiliga kynsbundið. Leiðslurnar eru næstan bara mannaðar við mannfólki. Allir stjórarnir og næstan allir virkisleiðararnir eru mannfólk. Og eru tað eisini mannfólk, sum hava tey flestu av hinum leiðslustørvunum. Undantakið hesum viðvíkjandi eru góðskuleiðarastørvini, ið ofta verða mannað av konufólkum. Bæði menn og kvinnur arbeiða sum “formenn”. Sostatt ber til at siga, at dreingir hava nógv fleiri “fyrimyndir” úti á virkjunum.

Konufólkini hava ofta meiri eintáttaðar arbeiðsuppgávur, har tær gera einfaldari arbeiði, og standa ofta leingi í sama stað, tá tær arbeiða, og tað kann eisini vera ringt at tosa saman.

Hinvegin eru stórir partar av arbeiðsuppgávunum hjá monnum á flakavirkjunum ofta meiri fjølbroyttar. Hetta er serliga galdandi hjá teimum, sum arbeiða úti, men eisini inni á virkinum er hetta støðan. Mannfólkini hava sum heild betri møguleikar fyri sjálvir at leggja arbeiðið til rættis, og teir hava munandi betri møguleikar fyri at samskifta í arbeiðstíðini (Husmo & Munk-Madsen, 1994, s.180-182).

Munirnir í vanliga starvsinnihaldinum hjá ávíkavist gentum og dreingjum kann vera ein orsøk til, at so nógv færri gentur hava positivar royndir av at arbeiða í fiskivinnuni á landi.

Men umframt hetta er tað eisini ógvuliga ymiskt, hvussu tey ungu hava trivist í fiskivinnuni alt eftir, hvar tey hava roynt seg. Á mynd 2.7




N=856

**Mynd 2.8**
*Sp. Í hvønn mun tekur tú undir við hesum pástandum ? Fiskivinnan gevur møguleikar fyri góðari inntøku. Í hvønn mun tekur tú undir við hesum pástandum ? Fiskivinnan gevur fakligar avbjóðingar*

sæst, at tey ungu hava trivist best á sjónum, meðan tey hava trivist ringast á fiskavirkjunum. Millum tey ungfólkini, sum hava róð út, siga meir enn 70% av teimum, at teimum hevur dámt sera væl (43%) ella væl (38%), og ongin sigur seg hava trivist illa. Eisini ein stórur partur av teimum, sum hava verið til skips, hava havt góðar royndir av tí - 38% dámdu sera væl, meðan 25% dámdu væl. Gott og væl tíggjundi hvør hevur ringar royndir av at vera til skips. Tað eru eisini nógv av teimum, sum hava arbeitt á alibrúkum, ið hava trivist væl. Meir enn 80% láta væl at (35% sera væl, og 31% væl).

Tann vinnugreinin, har tey flestu ungu hava roynt seg, er á fiskavirkjunum. Hetta er eisini tann vinnugreinin, har tey ungu hava trivist ringast. Her eru tey munandi færri, sum hava trivist væl – einans 31%. Nógv siga , at teimum hevur dámt arbeiðið nøkulunda (43%), men um fjórði hvør (26%) sigur, at sær hevur beinleiðis dámt illa.

Viðvíkjandi skipabólkunum, sum hava størst áhuga millum ungdómin, liggja trolarar undir Føroyum fremst, síðani koma langfaratrolararnir. Útróðrarbátar og garnaskipini høvdu minstan áhuga, sí mynd 2.9. Hetta kann geva eina ábending um, hvussu trupult ella lætt tað verður at manna teir ymisku skipabólkarnar í framtíðini.

## Ymsar fortreytir at fáa arbeiðsmegi

Hvussu væl tey ungu hava trivist í fiskivinnuni, avspeglar eisini nokkso væl, hvussu lætt tað er hjá ymsu pørtunum í fiskivinnuni at fáa starvsfólk. Skipini hava munandi minni trupulleikar við at fáa arbeiðsmegi t.d. enn virkini á landi. Vit hava ikki spurt tey ungu, hví tey hava trivist væl ella illa. Tá spurt varð um, hvat tey ungu ynsktu sær av teirra starvi, vísti kanningin, at umframt góða løn, so vóru avbjóðingar og fjølbroytni høgt í metum. Ein orsøk til, at fiskiskapur og alivinna eru betur umtókt enn arbeiði á fiskavirkjunum og kryvjivirkjunum kann vera, at hesi størv eru betur lønt og sum heild fjølbroyttari og størri avbjóðing. Uppgávurnar á fiskavirkjunum eru sjálvandi rættiliga ymiskar, men tað skerst ikki burtur, at nógv fiskaarbeiði á landi kann vera rættiliga eintáttað. Ein onnur orsøk til, at stórur partur av teim-




N=855

**Mynd 2.9**
*Sp: Um tú skuldi farið til skips, hvørjum skipabólki kundi tú hugsa tær at farið við?*




**Mynd 2.10**
*Sp. Heldur tú, at eitt starv innan fiski– og alivinnuna hevði kunnað livað upp til tíni krøv omanfyri (sp.13)?*

um ungu hava positivar royndir av at vera til skips ella útróðrar, kann eisini vera, at fiskiskapur hevur høgan status millum dreingir.

**Fiskivinnan og ynskini hjá ungdóminum**
Sum vit longu hava nevnt, eru tey mest útbreiddu ynskini til framtíðarstarvið hjá ungdóminum, at starvið gevur góða løn, spennandi avbjóðingar, at tað passar til teirra evni og førleika, og at passaligt býti er millum arbeiði og frítíð. Ongin orsøk er at halda, at størv – t.d. leiðara- og millumleiðarastørv í fiskivinnuni – ikki kunnu liva upp til hesi krøv, tvørturímóti. Men hvat heldur ungdómurin um fiskivinnuna?

Góð inntøka vóru tey viðurskifti, sum flest ung tóku undir við, tá ið tey skuldu siga, hvat tey løgdu størstan dentin á, tá tey skuldu velja sær útbúgving og arbeiði. Í mynd 2.8 sæst, at ein stórur meiriluti, 81% , tekur undir við, at fiskivinnan gevur møguleikar fyri góðari inntøku. Ein munandi partur ynskir eisini, at teirra framtíðarstarv gevur teimum spennandi og krevjandi avbjóðingar. Í somu mynd sæst, at umleið helvtin heldur, at tað í stóran ella í ávísan mun ber til at fáa hesar avbjóðingar í fiskivinnuni. Hinvegin er tó meir enn ein triðingur, sum er heilt ósamdur í hesum sjónarmiði, og bert í minni mun ella als ikki heldur, at fiskivinnan kann geva teimum fakligar avbjóðingar. Eisini í hesum føri eru dreingirnir meiri positivir mótvegis teimum møguleikum, sum eru í fiskivinnuni. Væl fleiri dreingir enn gentur halda, at fiskivinnan kann geva fakligar avbjóðingar og góða inntøku.

Samanumtikið heldur ein ávísur partur av ungdóminum, at fiskivinnan kann geva teimum góða løn og avbjóðingar. Men halda tey , at fiskivinnan sum heild kann liva upp til onnur krøv, ið tey seta til eitt gott starv, sum t.d. at starvið passar til evni og førleika, er spennandi og gevur møguleika fyri einum hóskandi býti millum arbeiði og frítíð?

Her svara umleið 44% av teimum ungu, at eftir teirra tykki er fiskivinnan illa før fyri at liva upp til teirra ynski í mun til, hvussu teirra framtíðarstarv skal vera, sí mynd 2.10. Aftur her eru genturnar munandi meiri negativar mótvegis fiskivinnuni. Meir enn helvtin (51%) av gentunum halda, at fiskivinnan er illa før fyri at liva upp til krøvini. Millum dreingirnar eru teir umleið ein triðingur (35%), sum hava hesa áskoðanina.

Ein orsøk til, at genturnar í munandi minni mun halda, at fiskivinnan kann vera eitt framtíðarstarv fyri tey, kann saktans vera, at nógv færri gentur hava góðar egnar royndir av at arbeiða í fiskivinnuni. Ein onnur orsøk til, at so nógv fleiri gentur hava ringar royndir, er, at tær hava arbeitt á fiskavirkjunum. Sum vit eisini hava víst á, so er hetta tann parturin av fiski- og alivinnuni, har tey flestu, sum eru ónøgd, hava roynt seg.

Tað er áhugavert, at tey, ið hava roynt seg í fiskivinnuni, eru munandi meiri positiv enn tey, sum ikki hava roynt seg (sí t11.f2). Hinvegin eru væl færri av teimum, sum ikki hava arbeitt í fiskivinnuni, sum halda, at tað kann vera eitt nøktandi arbeiðspláss fyri tey. Hetta vísir týðiliga, hvussu umráðandi tað er, at ungdómurin fær møguleikan at royna seg í fiskivinnuni, og at tey fáa positivar upplivingar.

Mong eru tey, sum siga seg ikki vita, hvørt

fiskivinnan kann liva upp til teirra krøv, sí mynd 2.10. Nógvar orsøkir kunnu vera til hetta. Fyri tað fyrsta kann tað hugsast at vera ringt hjá teimum flestu at siga akkurát, hvat tey ynskja sær av sínum framtíðarstarvi. Eisini kann tað hugsast, at summi halda, at fiskivinnan kann liva upp til nøkur av teirra ynskjum, men ikki til onnur. Harumframt kann vantandi kunnleiki til hesa vinnuna vera ein orsøk.

## Ávirkan

Eyðvitað verða ungfólk ávirkað av umhvørvinum, heimi, vinum og skúla, í øllum lívsins viðurskiftum, og tí eisini, tá ið tey skulu velja útbúgving og starv. Í kanningini hava vit tí spurt næmingarnar, um tey verða eggjað til fiskivinnu sum eitt møguligt lívsstarv, sí mynd 2.11. Upp á henda spurning svaraðu 20% av dreingjunum og 7% av gentunum, at tey vóru eggjað til tess. Tey, sum høvdu eggjað teimum vóru í flestu førum pápar, abbar ella onnur í familjuni.

Tølini vísa eisini, at tað bara er ein avmarkaður partur (14%) av teimum ungu, sum halda, at tey læra nógv um fiskivinnu í skúlanum. Harafturímóti eru sera nógv, sum halda, at tey læra í minna lagi ella einki (83%), sí mynd 2.12.

Tað er ein rímiligur partur (45%) av teimum ungu sum siga, at tey ikki vita nóg mikið um fiskivinnuna fyri at gera av, um hon er nóg áhugaverd sum arbeiðspláss fyri tey (sí t12.f2).

Hóast tað út frá hesum tølum kann sigast, at umhvørvið hjá teimum ungu ikki ger nógv við at fáa tey at hava áhuga fyri og starvast í fiskivinnuni, so hevur ungdómurin tó ein positivan hugburð til fiskivinnuna. Hetta má síggjast sum eitt úrslit av tí vitan, tey hava ogna sær aðrar vegir, m.a. við sjálvi at taka lut í og at hava arbeiðroyndir í vinnuni.

## Samanumtøka

Samanumtikið vísir kanningin, at fiskivinnan er rímiliga høgt í metum millum tey ungu. Tey hava sum heild ein positivan hugburð til fiskivinnuna. Nógv teirra gera sínar metingar við støði í egnum royndum innan hesa vinnu, tí nógv ung hava roynt at arbeiða í fiskivinnuni, og næstan øll kenna onkran væl, sum arbeiðir har. Lutfalsliga positivi hugburðurin til fiskivinnuna er ikki nøkur vissa fyri, at tey ungu fara at søkja arbeiði innan hesa vinnuna, men sjálvt um tey ungu ikki fara at arbeiða í fiskivinnuni, so fer ein positivur hugburður at hava týdning, um tað hevur við sær, at tey hava eitt forstáilsi fyri, hvat tað merkir at búleikast í einum fiskivinnusamfelag.

Sera stórur munur er á, hvar ávikavist gentur og dreingir hava hug at arbeiða. Hóast tey ungu sum heild eru positiv mótvegis fiskivinnuni, eru tað serliga tænastuvinnurnar, sum hava størstan áhuga sum starvsøki. Hetta er serliga galdandi fyri genturnar, ið einamest hava áhuga fyri tænastuvinnum, sum frisørar, heilsu- og almannaøkið og líknandi. Bert fáar gentur siga seg at vera áhugaðar at fáa starv innan fiskivinnuna. Millum dreingir er áhugin heilt øðrvísi. Tann vinnan, har flestir dreingir siga seg kunna hugsað sær at starvast, er innan fiskiskap - so eftir øllum at døma




**Mynd 2.11**
*Hevur nakar eggja tær til at gera fiskivinnuna til títt lívsstarv?*




**Mynd 2.12**
*Hvussu nógv læra tit um fiskivinnu í skúlanum?*

verður tað ikki nakar trupulleiki at manna føroyska fiskiflotan í framtíðini. Næstbest vælumtókta vinnan millum dreingir var handverk og bygging. Av øðrum vinnum, er m.a. tónleikur og list ovarlaga á ynskilistanum. Hinvegin liggur fiskivinnan á landi rættiliga langt niðri á listanum yvir vinnur, har flest ung hav hug at arbeiða.

Ein munandi partur av teimum ungu, sum hava arbeitt innan fiskivinnuna hava positivar royndir. Men stórur munur er á, hvussu ávikavist gentur og dreingir hava trivist. Dreingir flest hava trivist væl, meðan ein størri partur av gentunum ikki hava eins góðar royndir. Vert er at leggja til merkis, at tey sum hava roynt seg í fiskivinnuni eru munandi meiri positiv fyri at fiskivinnan kann liva upp til ynskini, tey hava til teirra framtíðarstarv, tá borið verður saman við tey, sum ikki hava roynt seg í hesari vinnuni.

Føroyskur ungdómur metir ikki, at hann fær nóg hollan kunnleika til fiskivinnu í skúlunum, og fleiri eru eisini í iva, um tey vita nóg nógv um fiskivinnuna til at gera av, um hon kann vera áhugaverd sum framtíðar arbeiðspláss.

## Niðurstøður

Í hesari frágreiðingini hava vit viðgjørt spurningin um, hvørjar vónir ungdómurin hevur til framtíðina, tá ið tað snýr seg um útbúgvingar- og vinnuval, og serliga knýtt hetta at spurninginum um rekruttering til fiskivinnuna. Í hesum partinum verður tikið samanum úrslitini av kanningini, umframt at viðgjørt verður, hvat hesi úrslit kunnu merkja fyri føroysku fiskivinnuna og hennara fortreytir fyri at fáa starvsfólk í framtíðini.

Ein greið niðurstøða í kanningini er, at tey ungu velja sær útbúgvingarvegin, og at tey síggja útbúgving sum tann týdningarmesta mátan at skapa sær eina trygga framtíð. Næstan øll tey ungu ætla at fáa sær eina útbúgving, og tey hava rættiliga stórar vónir til, at tað loysir seg. Tey ungu meta, at útbúgving kann geva teimum eina røð av fyrimunum, so sum betri møguleikar at sleppa at arbeiða við tí, tey hava hug til, betri vinnuligar møguleikar og størri ávirkan á egið arbeiði. Við øðrum orðum kann sigast, at útbúgving verður sæð sum vegurin til tað góða lívið. Tá tey skulu taka avgerð um, hvørja útbúgving, tey skulu fáa sær, og hvat tey ynskja av framtíðarstarvi sínum, eru tað teir persónligu fyrimunirnir, sum tey leggja dent á – at tey fáa góða løn og viðkomandi avbjóðingar. Tey meiri samfelagsligu atlitini, sum at útbúgvingin er týdningarmikil fyri samfelagið, og at útbúgvingin gevur teimum møguleikar at arbeiða í heimbygdini, verða hinvegin raðfest lægst. Hetta nýtist ikki at merkja tað, at tey ungu einans eru sjálvsøkin, men heldur tað, at teirra samfelagsligu atlit eru nøkur heilt onnur enn tey, sum eldra ættarliðið hevur lagt dent á.

Grundleggjandi hevur ein stórur partur av teimum ungu ein positivan hugburð til fiskivinnuna. Nógv halda, at fiskivinnan er framtíðarvinnan í Føroyum, og út ímóti helvtin av dreingjunum halda, at fiskivinnan kann liva upp til teirra ynski til eitt framtíðarstarv. Fiskiskapur var eisini tann vinnan, har flestir dreingir kundu hugsað sær at arbeitt. Men burtursæð frá fiskiskapi og handverki og bygging, so eru tað tænastuvinnurnar, sum hava størstan áhuga millum tey ungu. Hinvegin eru tey fá, ið ynskja sær at arbeiða í fiskivinnuni á landi og í alivinnuni.

Kunnleikin til fiskivinnuna hevur avgerandi ávirkan á møguleikarnar hjá fiskivinnuni at útvega sær starvsfólk. Hesin kunnleiki millum børn og ung er tó ikki so sjálvsagdur, sum hann var fyri bert fáum árum síðani. Heilsufrøðiligu krøvini til virkini á landi gerast alsamt strangari, og millum annað orsakað av hesum verða virkini meira afturlatin. Hóast hetta, so er fiskivinnan ikki fremmand fyri teimum flestu ungu. Umleið helvtin hevur roynt arbeiði í fiskivinnuni - tey flestu á flakavirki, egnt og rakt um ella verið til skips. Næstan øll kenna eisini onkran væl, sum arbeiðir í fiskivinnuni. Ein munandi partur av teimum, sum hava arbeitt í fiskivinnuni hava positivar royndir av hesum. Tað er tó stórur munur á royndunum hjá gentum og dreingjum, har væl fleiri dreingir hava góðar royndir. Tað er eisini stórur munur á, hvussu væl tey hava trivist, alt eftir, hvar ið tey hava arbeitt. Tað eru tey, sum hava roynt seg á sjónum - hava róð út, verið til skips ella arbeitt á alibrúki - sum eru mest positiv. Hinvegin eru tað lutfalsliga fleiri av teimum, sum hava arbeitt í fiski- og alivinnuni á landi, sum ikki hava positivar royndir.

Tað er vert at leggja til merkis, at munandi fleiri av teimum, sum hava roynt seg í fiski- og alivinnuni, halda, at fiskivinnan kann liva upp til teirra krøv og ynski til framtíðarstarv, samanborið við tey, ið ikki hava roynt at arbeiða innan hesar vinnur. Hetta er enn ein orsøk til, at tað er týdningarmikið, at ungfólk framhaldandi eiga at fáa møguleikan at arbeiða í fiski- og alivinnuni t.d. í summarfrítíðini.

Hóast fiskivinnan ikki er fremmand fyri teimum ungu, vóru tey bara 40%, sum hildu seg vita nóg mikið til at kunna gera av, um fiskivinnan var áhugaverd sum arbeiðspláss fyri tey, meðan 46% av teimum ungu ikki hildu seg hava ta neyðugu vitanina. Tey ungu meta heldur ikki, at tey læra serliga nógv um fiskivinnu í skúlanum. Næstan 85% siga, at tey læra lítið og einki um fiskivinnu í skúlanum, meðan einans góð 15% siga seg læra nógv.

### Fiskivinna og økismenning

Umframt, at fiskivinnan má liva upp til krøvini, ungfólk hava til starv sítt, so hevur staðið, har virkið er, eisini avgerandi týdning fyri, hvørt ungfólk velja at starvast innan eina vinnu. Samstundis eru flestu økini í Føroyum rættiliga knýtt at gongdini í fiskivinnuni - bæði búskaparliga og sosialt. Tí hevur tað týdning at vita, hvønn hug-

burð ungdómurin hevur til at vera búsitandi í heimbygdini, ella at venda aftur eftir lokna útbúgving.

Umleið ein triðingur av føroyska ungdóminum ivast, hvar hann ella hon vil seta búgv, tá tey eru liðug við útbúgvingina. Hetta er galdandi fyri tey ungu um alt landið – tað vil siga, at eisini í teimum størru plássunum eru tey nógv, sum ivast í spurninginum um, hvørt tey kundu hugsað sær at búð í heimbygdini eftir tað, at tey hava nomið sær útbúgving. Tað, at so nógv ivast í, hvar tey vilja búgva, undirstrikar, at Føroyar eru í einari støðugari kapping við útheimin um at fáa ungfólk at búsetast í Føroyum. Hetta er ongin nýggj støða, tí í nógv ár hevur tað – sum heild – verið soleiðis, at fleiri fólk eru flutt úr Føroyum enn til Føroya. Vitanin um, hvat hendir aðrastaðni, hevur tó ongantíð verið størri enn í dag. Fólk ferðast nógv og fáa dagliga vitan um, hvat fyriferst rundan um okkum gjøgnum sjónvarp, útvarp og alnet. Hetta er sostatt ein gongd, sum vindur uppá seg, og tí av serstakliga stórum týdningi hjá vinnu og myndugleikum at fyrihalda seg til.

Meir enn ein triðingur av øllum gentunum í kanningini siga, at tær ynskja at búgva í útlondum eftir tað, at tær eru lidnar at útbúgva seg. Hetta kann takast sum eitt tekin til føroyska samfelagið um, at tað er ikki nóg áhugavert fyri ein munandi part av føroyskum konufólkum at vera her. Tað verður ofta ført fram, at t.d. bygdatilveran riggar betur til mannfólk við tað, at fleiri arbeiðsuppgávur eru til menn meir enn til konufólk. Meginparturin av konufólkunum ynskja sær eisini starv í tænastuvinnunum, og hesi størvini eru nú einaferð fyrst og fremst á størru plássunum, serliga í Havn.

Tað, at ungdómar noyðast at flyta fyri at fáa sær útbúgvingina, er ikki í sær sjálvum ein trupulleiki, tvørturímóti. Koma tey aftur, hava tey ofta við sær nýggjar førleikar, royndir og hugskot, ið eru avgerandi fyri framhaldandi lokalari menning og trivnaði. Spurningurin er, hvørt tey koma aftur.

Nógv ung – uml. 60% – eru áhugað í at búseta seg í heimbygdini, tá ið tey eru liðug at útbúgva seg, um tað nú annars ber til. Tað ber sostatt til at vinna ungdómin aftur, tá hann fer at seta búgv. Men eisini hetta setur krøv til lokala arbeiðsmarknaðin og trivnaðarpolitikkin. Tað krevur, at tey kunnu fáa nakað at búgva í, fáa børnini ansað og eitt vælvirkandi lokalt felagslív.

Men fyrst av øllum krevur tað, at tey kunnu fáa eitt avbjóðandi arbeiði innan starvsøkið, sum útbúgvingin ger tey skikkað til. Framhaldandi menning av privatu - og almennu - fyritøkunum úti um landið er her av serstakliga stórum týdningi. Og her hava fiski- og alivinnan ein avgerandi leiklut.

**Tey ungu og framtíðin hjá fiskivinnuni**

Taka vit afturíaftur, at tey flestu ungu raðfesta at fáa sær eina útbúgving, merkir tað, at tað verður alsamt lættari hjá vinnuni at fáa útbúgvið fólk til tey størv, har útbúgving er ein fyrimunur. Hetta fer helst at hava við sær, at útbúgvingarstøðið í fiskivinnuni framhaldandi fer at hækka. Økta útbúgvingar- og førleikastøðið hevur við sær, at møguleikarnir hjá vinnuni fyri at mennast og fáa sum mest burturúr royndum, vitan og nýskapan úr øðrum londum, gerast alsamt betri.

Vansin kann verða, at parturin av fólkinum, sum er áhugaður í einum ófaklærdum starvi, verður alsamt minni, og tað kann føra til trupulleikar við rekruttering til ávís størv. Hvussu lætt ella trupult tað er hjá fiskivinnuni á landi at fáa arbeiðsfólk, hongur partvís saman við, hvussu teir búskaparligu konjunkturarnir í Føroyum eru. Men í mun til krøvini og ynskini, sum tey ungu seta til eitt starv, kann spurningurin vera, í hvønn mun tað ber til hjá fiskivinnuni at liva upp til hesi ynski? Til hetta er at siga, at nógvir av teimum eginleikunum, sum verða raðfestir hægst, eru viðurskifti, ið snúgva seg um, hvussu fyritøkurnar eru skipaðar innanhýsis. Tað, ið tey allarflestu leggja dent á, er lønin. Hetta er nakað, sum tann einstaka fyritøkan, í prinsippinum, sjálv ger av. Tó setur kappingarstøðan hjá hvørjari einstakari fyritøku sjálvsagt avmarkingar fyri, hvussu høga løn hon kann bjóða sínum starvsfólkum.

Hini viðurskiftini, talan er um, eru t.d.:

- At starvið passar til míni evni og mín førleika
- At arbeiðið gevur mær spennandi og krevjandi avbjóðingar
- At eg havi dámligar starvsfelagar
- At passaligt býti er millum arbeiði og frítíð/familjulív
- At arbeiðið er fjølbroytt

Hjá virkjunum ræður sostatt um at seta røttu fólkini til røttu størvini, at birta uppundir gott sosialt umhvørvi, og annars at leggja starvsfólkapolitikkin soleiðis til rættis, at til ber hjá starvsfólkunum at fáa arbeiðs- og familjulív at sampakka. Alt

hetta eru viðurskifti, sum lutvíst kunnu verða avgjørd innanhýsis hjá einstøku fyritøkuni. Tað merkir, at um tann einstaka fyritøkan hevur møguleikan og er til reiðar at leggja arbeiðsgongdirnar til rættis í mun til ynskini hjá starvsfólkunum, átti tað at borið væl til at livað upp til tey krøv / ynski, sum ungdómurin setur.

Fortreytirnar hjá ymsu vinnunum fyri at megna at gera seg áhugaverdar millum ungfólk - og onnur starvsfólk - eru rættiliga ymiskar. Talan kann m.a. vera um, at tøkni, úrdráttir og framleiðslugongdir seta avmarkingar fyri, hvussu lætt tað er at gera nakað, ið veruliga munar við nevndu viðurskifti – t.d. á flakavirkjunum. Tað eru eisini nógv føroysk virki, sum miðvíst arbeiða við at betra umstøðurnar, t.d. gjøgnum íløgur í nýggja framleiðslutøkni, ið er meiri høglig fyri starvsfólkini. Og okkurt virki hevur gjørt avtalu við fysioterapeut um at mýkja vøddarnar á starvsfólkunum, umframt aðrar ábøtur og ágóðar.

## Tilmæli

At enda skulu vit, við støði í teimum úrslitum henda frágreiðingin hevur tikið fram, koma við nøkrum almennum tilmælum, sum greitt fara at vera við til at styrkja rekrutteringina til framtíðar føroysku fiskivinnuna, og møguliga gera fiskivinnuna áhugaverdari fyri ungfólk.

- Skúlaverkið eigur at gera meira burtur úr fiskivinnuni í sínari frálæru, ikki bert bókliga frálæru, men eisini verkliga. Sum dømi kunnu vit nýta Norra, har frálæran um fiskivinnu í nøkrum førum byrjar longu á dagstovnunum. Seinni, tá ið tey koma í m.a. framhaldsdeildini í fólkaskúlanum, gera tey verkætlanir innan fiskivinnu. Dømi eru um næmingar, ið fara til lond, ið keypa norskan fisk. Har seta tey seg inn í marknaðin og mentanina hjá keyparanum. (www.kunnskapig.no/prosjekt/pro_fiskeri.htm)

- Tað hevur týdning, at tey ungu, sum royna seg í fiskivinnuni, fáa "positivar upplivingar", serstakliga gentur á fiskavirkjunum. Hetta eiga allir partar í fiskivinnuna at hava í huga, tá ið tey fáa ung fólk í starv t.d. í summarfrítíðini.

- Fiskivinnan eigur at skipa so fyri, at børn og ung í størri mun fáa høvi at "uppliva" umhvørvið í fiskivinnuni - sleppa inn á virkini, um borð á skip og annars fáa innlit í, hvat fiskivinnan hevur at bjóða.

- Tað er neyðugt í størri mun at skapa eitt javnari kynsbýti í fiskivinnuni. Kvinnum eigur í størri mun enn nú at standa í boði aðrar uppgávur enn tær traditionellu ófaklærdu uppgávurnar. Rekruttering av kvinnum verður í framtíðini nógv tengd at, hvussu avbjóðandi og áhugaverd fiskavirkini kunnu gerast sum arbeiðspláss.

- Fiskivinnan gerst alsamt meira ein vitanarvinna. Hetta gevur vinnuni møguleika at útvega sær fólk við millum- og hægri útbúgvingum. Men hetta krevur, at fiskivinnan í størri mun kunnar ungfólk og lesandi um tey fakliga avbjóðandi størvini, sum eru í hesi vinnu.

# Keldulisti

Arbo, P. (1997) Høyere utdanning i Nord-Norge - En drivkraft for utvikling eller avfolking av landsdelen?" Universitetet i Tromsø.

Elstad, Å. (1999) Changing labour roles in north Norwegian fisherman-farmer housholds í Gerrard, S. and Rønning Balsvik, R. (red.) *Global coasts – Life changes, gender challenges.*. Kvinnforsk Occasional papers, University of Tromsø.

Forchammer, J (1998) *Ung med tv*. Nordisk Ministerråd, København. Nord 1998:5

Fossum, S. (1992) *Ung i Nord - Strategier og tiltak for ungdomsrekruttering*. Sluttrapport fra "Ung i Nord" – Prosjektet. Bodø. Statens forvaltningstjeneste Oslo.

Hagstova Føroya (2003) *Árbók fyri Føroyar 2003*. Hagstova Føroya og Føroya Skúlabókagrunnur

Hovgaard, G. (1998) At lesa seg av bygdini. Pp. 245-268 í Dahl, Á. *Føroya Lærarafelag 100 ár 1898-1998*. Bókadeild Føroya Lærarafelags

Hovgarrd, G. & West, H. (2003) *Rekruttering av høgt útbúnari arbeiðsmegi til fiskivinnuna*. Arbeiðsrit nr. 4/2003, Granskingarverkætlanin fyri Økismenning

Huset Mandag Morgen (2001) *Guide til næste generation – En analyse af fremtidens medarbejdere*. Mandag Morgen, Strategisk Forum.

Husmo, M & Munk Madsen,E. (1994) Kjønn som kvalifikasjon i fiskeindustrien, í Otterstad, O. og Jentoft, S. (red) *Leve kysten?* Strandhogg i fiskeri-Norge.

Illeris, K., Katznelson, N, Simonsen, B og Ulriksen, L. (2002) Ungdom, identitet og uddannelse. Roskilde Universitets Forlag.

Jónsson, F. H., Guðmundsdóttir, H. og Sigurðsson, K. (2000) De unges livssyn i Vestnorden - de unges livsværdier i Island, Grønland og på Færøerne. Socialvidenskabelige Institut ved Islands Universitet for Vestnordisk Råd 1999-2000

Karlsen, U.D.(2001) *Ung i spenningens land. Analyser av preferanser knyttet til valg av utdanning, yrke og bosted blant Nordnorsk ungdom*. Avhandling for graden doctor rerum politicarum Institutt for sosiologi, Det samfunnsvitenskapelige fakultet, Universitetet i Tromsø.

Knudsen, A og Jensen, C.N. (red.) (1999) *Ungdomsliv og læreprocesser i det moderne samfund.* Billesø og Baltzer.

Lie, M. "Fleksibilitet (1994) Et nytt arbeidsliv eller gammelt nyt? *Sosiologisk tidsskrift* 4 (1994) Scandinavian University Press.

Listhaug, O., Myklebust, J.O. og Vik, L.J. "Bygdeungdom med byplanar – Ei oppfølgingsundersøking 1949 – 1979". Tidsskrift for samfunnsforskning 1980, bind 21, 383-394.

Simonsen, B. "Unges prioriteringer når de vælger arbejdspladser – generelle tendenser". Í hefti som FOA gav út í samband við ráðstevnu 11.03.2002.

Simonsen, B. & Katznelson, N.(2000) "Unges arbejdsbegreb". í Tidskrift for Arbejdsliv. 2. årgangur. Nr. 4.

Simonsen, B. (2000) "Brydninger i demokratiet". Grein í bókini: Gitt Bykilde (red). Når unge udfordrer demokratiet - dokumentation og debat. Roskilde Universitetsforlag 2000.

Soininen, A. (2000) "Living in the North Or Moving to the South – Young people And Their Future Plans". Paper presented in Nordic Youth Researsh Symposium 2000. Helsinki.

# Fylgiskjøl

## Fylgiskjal 1.

### Framferðarháttur

Henda kanning er ein spurnablaðskanning, sum er gjørd millum føroyska ungdómin. Kanningin byggir á spurnabløð, sum hava verið býtt út millum næstan 1000 næmingar í føroyska útbúgvingarverkinum. Hetta vóru teir næmingarnar, sum í januar 2003 gingu í 9. flokki í føroyska fólkaskúlanum, eins og teir næmingar, sum tá gingu seinasta árið í miðnámsskúlunum. Hesi ungfólkini standa og skulu taka týðandi avgerðir, sum koma at ávirka teirra lívsleið, og tí er tað týdningarmikið at spyrja tey, hvørjar tankar og ynski tey hava í hesum sambandi.

Fleiri fyrimunir eru við at nýta spurnablaðskanningar sum samfelagsvísindaligt háttalag. Við einari spurnablaðskanning ber til at fáa kunnleika um, hvussu útbreiddar fatanir og meiningar eru millum fólk innan tað evnið, ið ætlanin er at kanna. Við støði í innsavnaða tilfarinum ber eisini til at kanna, um ymiskir bólkar av fólki í størri mun enn aðrir hava serstakar meiningar. Til dømis dreingir samanborið við gentur, og ung av bygd samanborið við ung úr býum.

Men ikki einans fyrimunir eru við at brúka kvantitativar spurnablaðskanningar. Ein vansi er, at granskararnir framman undan, at tilfarið verður innsavnað, gera av, hvat ið er mest áhugavert at spyrja um, orða spurningarnar frammanundan og avgera svarmøguleikarnar, sum svarpersónarnir hava at velja ímillum. Hetta kann hava við sær, at spurnablaðið, og harvið innsavnaða tilfarið, ikki rakar teir spurningar og tey viðurskifti, sum seinni vísa seg at vera av stórum týdningi.

Tað ber tó til at minka um hesar veikleikarnar við at fara vandaliga fram. Hetta er serliga galdandi, tá spurnablaðið verður gjørt. Tað er týdningarmikið at gera sær stóran ómak við at orða spurningarnar, soleiðis, at spurnablaðið megnar at savna neyðugu vitanina.

Skal tað bera til at generalisera við støði í spurnarkanningini, soleiðis at kanningin kann vera alment galdandi, ella fevna um ein størri bólk enn tey spurdu, so er týdningarmikið, at innsavnað verður eitt tal av spurnabløðum, sum er

### Hvørji eru tey, ið hava svarað?

| Svarprosent | | | |
|---|---|---|---|
| | Send | Innkomin | Svar |
| Fólkaskúlin | 660 | 596 | 90% |
| Miðnámsskúlarnir | 338 | 287 | 85% |
| - | | 16 | |
| Tilsamans | 998 | 899 | 90% |

| Kynsbýtið í kanningini | | |
|---|---|---|
| | Tal | Prosent |
| Gentur | 486 | 54,3% |
| Dreingir | 407 | 45,7% |

| Kynsbýtið á skúlunum | | | |
|---|---|---|---|
| | Gentur | Dreingir | Tils. |
| Fólkaskúlin (9.fl.) | 304 (51%) | 291 (49%) | 595 |
| Studentaskúlin / HF | 127 (65%) | 67 (35%) | 194 |
| Handilsskúlin | 44 (54%) | 38 (46%) | 82 |
| Tekniski skúli | 4 (36%) | 7 (64%) | 11 |

| Hvussu nógv fólk búgva í kommununi, har tú vaks upp? | | |
|---|---|---|
| | Tal | Prosent |
| Undir 200 | 36 | (4%) |
| 200-499 | 73 | (8%) |
| 500-999 | 137 | (16%) |
| 1000-1999 | 176 | (20%) |
| 2000-4999 | 96 | (11%) |
| 5000 ella fleiri | 357 | (44%) |

nóg stórt til, at til ber at siga nakað munagott um tann bólkin, sum verður kannaður, og at tey, sum spurd verða, umboða populatiónina alla, sum hon er, so væl, sum til ber.

Í innsavningararbeiðnum bóru vit okkum soleiðis at: vit ringdu fyrst til allar skúlarnar og greiddu skúlaleiðslunum frá, hvat kanningin snúði seg um og spurdu, um teir vildu hjálpa okkum við kanningini. Allir skúlarnir vóru sera beinasamir og vildu gjarna hjálpa okkum. Ein persónur á hvørjum skúla fekk ábyrgdina av, at næmingarnir fingu spurnabløðini útflýggjað, svarað og innsavnað. Eftir hetta vitjaðu vit teir flestu skúlarnar og góvu teimum spurnabløðini til tey, sum høvdu ábyrgdina av, at tey vórðu svarað. Í nøkrum førum vórðu spurnabløðini tó send við postinum. Spurnabløðini vórðu svarað inni í ymsu flokkunum undir leiðslu av einum lærara.

**Útbreiðsla av spurnablaðnum**

Spurnablaðið varð býtt út til allar næmingar, ið gingu í 9. flokki í føroyska fólkaskúlanum skúlaárið 2002/03 eins og teir næmingar, sum gingu seinasta árið í føroysku miðnámsskúlunum skúlaárið 2002/03 – t.e. Studentaskúla, HF-skeið, Handilsskúla og Tekniska skúla.

Talið av spurnabløðum í alt, sum varð latið skúlunum, var 998. Av teimum vórðu 660 latin øllum 9. flokkunum í Føroyum. Av teimum fingu vit 596 spurnabløð aftur. Tað merkir, at 90 % av næmingunum í 9. flokkunum hava svarað. Umframt hetta vórðu tilsamans 338 spurnabløð send teimum næmingum, sum gingu seinasta árið á Miðnámsskúlunum. Av teimum fingu við 287 svarað bløð aftur – t.e. 85%.

Talið av spurnabløðum, sum eru lisin inn í telduskipan, er 899, ið svarar til 90% av øllum teimum spurnabløðum, sum vórðu latin skúlunum. Hetta má metast at vera eitt rættiliga gott úrslit og er eitt gott grundarlag at byggja okkara kanningar á.

Á Tekniska skúla í Klaksvík ber til at taka útbúgvingina Tekniskt Studentsprógv, sum er ein miðnámsskúlaútbúgving, ið serliga er ætlað teimum, ið hava áhuga fyri at arbeiða við tøkni, bæði verkliga og ástøðiliga

# Fylgiskjal 2. Talvur frá 1 - 12

### Talva 1

| Ætlar tú at fáa tær eina útbúgving? | |
|---|---|
| Ja | 91% |
| nei | 1% |
| Veit ikki | 8% |
| | N=898 |

### Talva 2.

| Um tú ætlar tær eina útbúgving nær verður tað? | |
|---|---|
| Alt fyri eitt | 6% |
| Eftir fólka/ miðnámsskúla | 50% |
| Seinni | 45% |
| | N=831 |

### Talva 3

| Hví ætlar tú tær ikki undir útbúgving alt fyri eitt? (nøkur dømi) |
|---|
| Eg tími ikki!<br>Eri skúlatroytt/ur!<br>Ætli at vinna pening fyrst!<br>Veit ikki, hvat eg vil!<br>Njóta lívið fyrst!<br>Tað tekur ov langa tíð! |

### Talva 4

| Samlaða talið av teimum, sum vita hvørja førleikagevandi útbúgving, tey kundu hugsað sær? | |
|---|---|
| Ja | 50,46% |
| Nei | 49,54% |
| | N=862 |

### Talva 5

Býtið millum gentur og dreingir, sum ætla at fáa sær eina útbúgving

| | Ja | Nei | Veit ikki |
|---|---|---|---|
| Gentur | 95,9% | 0,2% | 3,9% |
| Dreingir | 85,5% | 2,5% | 12% |
| | | | N: 890 |

### Talva 6

Hvussu trívast næmingar í ávíkavist miðnáms- og fólkasskúlanum

| | Sera væl | Væl | Nøku-lunda | Illa | Sera illa |
|---|---|---|---|---|---|
| Miðnáms-skúla-næmingar | 12% | 40% | 40% | 3% | 5% |
| 9.floks-næmingar | 4% | 22% | 43% | 14% | 16% |
| | | | | | N: 872 |

### Talva 7

Hvat er/var tín miðalkarakterur í fólkaskúlanum?

| | Lægri enn 8 | Millum 8 og 10 | Hægri enn 10 |
|---|---|---|---|
| Gentur | 12% | 83% | 5% |
| Dreingir | 27% | 69% | 4% |
| | | | N=861 |

### Talva 8

| Væntar tú at sleppa at arbeiða við tí, tú helst vilt? | |
|---|---|
| Heilt vist | 16% |
| Nokk so vist | 50% |
| Ósannlíkt | 12% |
| Rokni ikki við tí | 4% |
| Veit ikki | 18% |
| | N=887 |

### Talva 9

| Hugsar tú um, hvat starv/arbeiði, tú skalt hava í framtíðini? | |
|---|---|
| Í stóran mun | 50% |
| Í vissan mun | 36% |
| Í minni mun | 12% |
| Als ikki | 1% |
| Veit ikki | 1% |
| | N=884 |

**Talva 10**

| Í Føroyum eru í dag nøkur størv innan fiskivinnugransking, tøknimenning, o.l. - kundu hesi størv havt tín áhuga? | | | |
|---|---|---|---|
| | Ja | Møguliga | Nei |
| Gentur | 6% | 43% | 51% |
| Drongur | 13% | 56% | 32% |
| | | | N=867 |

**Talva 11**

| Tey, ið hava roynt seg í fiskivinnuni eru meiri positiv | | | | |
|---|---|---|---|---|
| | Ja, væl | Hampi-liga væl | Illa | Veit ikki |
| Hava arbeitt í fiskivinnuni | 17% | 27% | 37% | 19% |
| Hava ikki arbeitt í fiskivinnuni | 5% | 15% | 51% | 29% |

**Talva 12**

| Heldur tú, at tú veitst nóg mikið um fiskivinnuna til at gera av, um hon er áhugaverd sum arbeiðspláss fyri teg? | |
|---|---|
| Ja | 40% |
| Nei | 45% |
| Veit ikki | 15% |
| | N=886 |